# FÓTBÓLTUR KAPPINGARÁRIÐ 2025

FSF FÓTBÓLTSBLAÐIÐ

Hetta blað er **ókeypis!**



#SAMAN**FRAMÁ**


Vitja nethandilin her
LANDSLIÐSBÚÐIN
Á TÓRSVØLLI
#samanframá

# Fótbóltur stóran samfelagsligan týdning



**Christian F. Andreasen**
*FSF-forseti*

*Nú fer fótbólturin aftur á rull, og feløgini hava fyrireikað seg væl til eitt nýtt kappingarár. Gentur og dreingir, kvinnur og menn fara at bresta saman í leiki – einum leiki, sum vit øll elska og eru spent í*

**Men fótbóltur er ikki bara spennandi – fótbóltur hevur eisini stóran týdning fyri okkara samfelag. Lat meg nevna nøkur viðurskifti, sum eru viðkomandi.**

Fótbóltur stendur fyri felagsskapi og samanhaldi, har fólk í øllum aldri og við sera ymiskum bakgrundum koma saman. Leikarar, viðhaldsfólk, hjálparfólk og onnur seta hvør øðrum stevnu, skifta orð, skapa vinarlag og trivna.

Fótbóltur er pallurin, har fólk, uttan mun til starv, politiskan lit, átrúna, umframt onnur áhugamál, kunnu møtast, sjálvt um meiningarnar kunnu vera ógvuliga ymiskar, og brotasjógvarnir leika í, eru øll kortini á somu bylgjulongd.

Fótbóltur fremur eisini likamliga rørslu og er tí góður fyri heilsuna. Fótbóltur fyribyrgir sjúkum, minkar um strongd og er ein týðandi partur av okkara vælveru.

Hetta fantastiska spæl hevur eisini eitt stórt útbúgvingarligt virði. Fleiri kanningar hava staðfest, at ung, sum luttaka í ítrótti, klára seg væl innan útbúgvingarøki. Gjøgnum fótbóltin læra okkara ungu at arbeiða saman, at hava disiplin og at taka ábyrgd – bæði í viðgongd, og tá tað gongur ímóti.

Fótbóltur hevur eisini eina mentanarliga ávirkan. Fótbóltur er við til at skapa okkara samleika sum tjóð, tí fótbólturin hevur ovurstóran áhuga millum manna úti í heimi.

Fótbóltur er ein pallur, har vit taka støðu til sosialar spurningar – eitt nú mannamun, rasismu og javnstøðu, samstundis sum fótbóltur ikki tekur støðu til politiskar spurningar, men fer fram á einum høgum etiskum stigi.

Samlað er fótbóltur nógv meira enn bara ein ítróttargrein og eitt spæl. Fótbóltur er ein týdningarmikil partur av okkara ungdómi, sosiala samanhaldi, vælveru og heilsu og erpna samleika okkara sum tjóð..

**Fari við hesum orðum at ynskja okkum øllum eitt gott kappingarár 2025**

**FSF FÓTBÓLTSBLAÐIÐ 2025**
**Útgevari:** Fótbóltssamband Føroya **Ábyrgd:** Hans Erik Danielsen
**Tekstur:** Tróndur Arge, Niels Petersen, Terji Nielsen, Símun Christian Olsen, Heðin Arge og Hans Erik Danielsen
**Myndir:** Andri Gerðisá, Bjarni Enghamar, Hans Erik Danielsen, Jóhanna Thomsen og UEFA
**Grafiskt snið:** Pætur Eyðunsson Jensen **Prent:** TrykNet



Eitt felag
*vit eiga*
í felag

betri.fo

betri

# Stóra putlispælið

*Tað er eitt stórt og krevjandi putlispæl, sum skal leggjast, tá landskappingin hjá monnum verður skipað og skal fáast upp á pláss. Longu frá uppsetingini eru ólíkatøl, og við nógvum atlitum er ómøguligt at ganga øllum ynskjum á møti*



*Ása Klakkstein Kalsø, leiðari í kappingar- og dómaradeildini hjá FSF*

**Tað ljóðar so einfalt,** at leggja ein landskapping, men sannleikin er, at føroyska landskappingin hjá monnum er eitt stórt putlispæl. Og aftur í ár, eins og seinastu mongu árini, var tað sjón fyri søgn, tá kappingarárið 2025 bleiv lagt til rættis fyri Betrideildina hjá monnum.

Tað byrjar longu við grundini. Í 2005 bleiv ein avgerð tikin, um at spælast skuldi tríggjar ferðir móti hvørjum. Við hesum bleiv landskappingin longd frá 18 umførum til 27 umfør. Longu nú er ójavni í, tí helmingurin av feløgunum fær ein heimadyst færri, og innanhýsis verður ójavni í hvør møtir hvørjum heima tvær ferðir.

Ása Klakkstein Kalsø er leiðari í kappingar- og dómaradeildini hjá Fótbóltssambandi Føroya, har hon, saman við kappingarumsitingini, hevur fingið til uppgávu at fáa stóra putlispælið at ganga upp.

– Hetta er ein avbjóðandi uppgáva, men hon er eisini spennandi, og tá samanum kemur koma vit altíð á mál, sigur Ása Klakkstein Kalsø.

## NÓGV AT FYRIHALDA SEG TIL

Í Betrideildini hjá monnum skal takast hædd fyri fleiri viðurskiftum.Feløgini hava 14 heimadystir og 13 útidystir annaðhvørt ár. Øll liðini skulu hava fýra ella fimm heimadystir í hvørjum triðingi av kappingini.

**„Hetta er ein avbjóðandi uppgáva, men hon er eisini spennandi, og tá samanum kemur koma vit altíð á mál“**

Afturat hesum skal javnvág eisini verða í mótstøðuni. Liðini í topp fimm frá í fjør, skulu í 2025 hava tveir heimadystir móti tveimum av hinum liðunum í topp fimm. Somuleiðis skulu liðini í botn fimm frá í fjør, hava tveir heimadystir móti tveimum av hinum liðunum í botn fimm í ár.

Tað er eisini stórur munur á at spæla á heimavølli og útivølli. Serliga kann hetta verða týdningarmikið við kappingarbyrjan og kappingarenda.

Tí er kappingin sett soleiðis saman, at liðini, sum í fyrsta umfari spæla á heimavølli, skulu spæla á útivølli í øðrum umfari. Liðini, sum á seinasta leikdegi spæla á heimavølli, skulu spæla á útivølli á næstseinasta leikdegi.

Hetta við heimavølli og útivølli er eisini galdandi, tá talan blívur um fleiri dystir upp í slag. Tí verður kappingin løgd eftir, at liðini skulu sum minst hava tríggjar heimadystir ella tríggjar útidystir á rað.

Eitt afturvendandi atlit hevur verið vøllurin í Gundadali, sum hýsur bæði HB og B36. Við hesum er neyðugt at taka hædd fyri, at tey skulu spæla so sjáldan sum tilber á heimavølli sama dag.

Og í ár skal eisini takast hædd fyri at bæði TB og FC Suðuroy eru í fremstu deildini, og at liðini úr Suðuroynni ikki spæla heima samstundis.

Tað er eisini onnur ynski. Eitt nú vilja feløgini hava heimadystir, tá tað eru stevnir og onnur stór tiltøk.

## PRAKTISKAR AVBJÓÐINGAR

Meðan fyrrnevndu avbjóðinginar í stóran mun koma undir rættvísi og kappingarleist, so er eisini talan um fleiri parktisk viðurskifti.

Ein av stóru avbjóðingunum er, at tað eru ov fáir dómarar. Í løtuni eru 90 dómarar og hjálpardómarar tøkir, og hvørt vikuskifti er brúk fyri í minsta lagi 86 dómarum og hjálpardómarum. Tí má kappingini eisini leggjast til rættis eftir tí.

Eitt annað er at 1. deild menn skulu altíð spæla áðrenn Betrideildin menn, og er hetta galdandi fyri dystir, tá 1. deildarliðið er fremsta lið hjá felagnum.

Harafturat skulu liðini hava tríggjar ella fýra dagar hvíld millum dystirnar og allir dystir í Betrideildini hjá monnum, og ein hvørt umfar í Betrideildini hjá kvinnum, skulu stroymast.

Hóast arbeitt verður við málinum á flestu vøllunum kring landið, so eru ljósviðurskiftini á nøkrum vøllum ikki nøktandi, meðan ein onnur avbjóðing er vallarpláss. Á onkrum vøllum er nógv virksemi onkur vikuskifti, og tá má hædd takast fyri, nær dystirnir kunnu spælast.

## EIN DYSTUR FLUTTI 26 DYSTIR

Ása Klakkstein Kalsø dylir ikki fyri, at tað er torført at fáa kappingina at ganga upp, og at nógvir ymiskir hættir eru nýttir – tó uttan nøktandi úrslit.

– Vit royndu at leggja kappingina við vitlíki, men tá allar treytirnar og ynsk-

**„Vit royndu at leggja kappingina við vitlíki, men tá allar treytirnar og ynskini vóru við, so gav vitlíkið upp“**

ini vóru við, so gav vitlíkið upp. Tað bar snøgt sagt ikki til at leggja kappingina, so øll fingu sítt, sigur leiðarin í kappingar- og dómaradeildini hjá FSF.

Ása fegnast tó um, at feløgini eru so skiljandi um støðuna, hóast tey gjarna vilja hava sítt í gjøgnum.

– Vit droyma, at tað innan stutta tíð verður ein skipan, har vit bara skulu seta liðini inn, so verður kappingin løgd av sær sjálvum, sigur Ása Klakkstein Kalsø.

Eitt eru ynskir og kappingarleistur. Eitt annað er veðrið og aðrar avbjóðingar, sum ongin av okkum kann hava valdið á.

– Tað er mangan, at vit halda ondini og vóna at veðrið skikkar sær væl. Tað er avmarkað við frídøgum, har vit kunnu leggja dystir. Dystarskráin er tøtt, tí tað er eisini landsliðsfótbóltur og Evropa-fótbóltur, sigur Ása.

Hon vísur eisini á eitt dømi frá í fjør, har ein dystarflyting setti gongd í eina domino-effekt, sum fevndi um alt frá Betrideildini til ungdómsfótbólt.

– Vit høvdu eina hending í fjør, har ein einkult dystarflyting gjørdi, at vit máttu flyta 26 aðrar dystir. Tað var frá Betrideildardystinum og heilt niður í U13. Tað var orsaka av millum annað dómaraáseting, vallarpláss og hvíludagar, sigur Ása Klakkstein Kalsø.

Skráin hjá Betrideildini hjá monnum er komin út og hevur verið til hoyringar hjá øllum feløgunum.

# NÓGVIR GLOTTAR Í HOYVÍK

*Hóast bestu liðini hjá felagnum høvdu eitt trupult kappingarár, so er einki at stúra fyri í Hoyvík. Felagið stendur í fagrasta blóma í ungdómsdeildunum*

**Tað er við brosi og orku,** at Fróði Danielsen, formaður í FC Hoyvík, fortelur um gongdina hjá felagnum í løtuni, hóast úrslitini hjá bestu liðunum vóru minni góð í fjør. Besta mansliðið flutti niður í triðjbestu deildina, meðan kvinnuliðið endaði aftast í Betrideildini hjá kvinnum.

Tað hava eisini verið avbjóðingar við umstøðunum. Eitt skifti mátti felagið útvega sær spannir, tí tað lak so illa í takinum á byngjunum, har felagið heldur til.

– Vit hava fleiri sólskinssøgur. Ein av teimum, sum er uttanfyri vøllin, er at Tórshavnar kommuna hevur sett tríggjar milliónir krónur av til projektering og útboð av nýggja felagshúsinum, sigur Fróði Danielsen.

Seinnu árini hevur FC Hoyvík okkurt árið einki felagshøli havt, og okkurt árið hevur kommunan strekt seg til at seta fýra byngjur upp til skiftirúm og felagshøli. Hóast umstøðurnar ikki fylgja við enn, so veksur felagið.

– Vit halda fram við at byggja felagið frá í fjør. Tey flestu í Hoyvík hoyra upprunaliga til eitt annað felag, men tey koma til, tí børnini spæla her. Vit vilja gjarna hava fleiri til. Í fjør fingu vit nógvar venjarar, nú royna vit at fáa fleiri fólk í tær ymisku nevndirnar, sigur Fróði Danielsen.

**„Tórshavnar kommuna hevur sett tríggjar milliónir krónur av til projektering og útboð av nýggja felagshúsinum“**

FC Hoyvík satsar nógv upp á ungdómin – Størstu ungdómsdeild

Sambært formanninum er størsta sólskinssøgan, at ungdómsdeildin hevur sett met við skrásettum limum.

– Vit hava 423 skrásettar limir, sum eru undir 17 ár. Tey tølini siga mær, at vit hava størstu ungdómsdeildina í landinum. Eg havi altíð sagt, at vit hava stórar møguleikar í Hoyvík og tað sæst aftur, sigur Fróði Danielsen.

Millum annað hava tað verið um hundrað børn til venjing hjá U7. Men tað hevur eisini sett ávís krøv til venjaraumfangið.

– Tað snýr seg ikki bara um at verða størst, men vit vilja eisini hava dygd. Tí settu vit okkum fyri í fjør, at seta fleiri venjarar til liðini. Tað hevur eydnast væl og vit síggja, at spælararnir trívast væl tá, sigur formaðurin.

FC Hoyvík hevur sett 32 ára gamla Casper Heinesen, ið seinastu tvey árini hevur verið menningarvenjari hjá Vanløse, sum høvuðsungdómsvenjara komandi tvey árini. Casper er hálvur danskari og hálvur føroyingur. Hann hevur ongantíð búð í Føroyum, men hevur røtur úr Porkeri.



*– Vit hava størstu ungdómsdeildina í landinum, sigur Fróði Danielsen, formaður í FC Hoyvík*



# Vit raka málið!




Málið við ungdómsdeildini nú er at fáa spælarar ígjøgnum, sum hava verið alla leiðina í felagnum. Í løtuni er talan oftani um hoyvíkingar, sum spæla við HB og B36, men skiftivís koma til FC Hoyvík, tá felagið hevur okkurt gott at bjóða. Enn gongur illa at fáa spælarar at taka lopið frá ungdómsdeildini og upp á besta liðið.

### MUGU BRÚKA NIÐURFLYTINGINA TIL NAKAÐ

FC Hoyvík hevur í fleiri ár liva sum eitt yo-yo lið millum 1. deild og 2. deild. Í ár gekk leiðin skeivan veg, men eisini í tí mást tú finna positiva sjónarhornið.

– Tað er lættari at seta ungar spælarar við í 2. deild, enn í 1. deild. Vit taka ikki lætt upp á uppgávuna, tí tú kanst eitt nú renna teg í fyrrverandi landsliðsspælarar og onnur í 2. deild, men krøvini eru ikki tey somu sum í 1. deild, sigur Fróði Danielsen.

Tað verða aftur í ár Bill McLeod Jacobsen og Heðin Askham, ið koma at standa á odda fyri besta mansliðnum. Tað verður arbeitt við at hava nakrar eldri spælarar, sum kunnu vísa vegin, men stóra málið er at byggja ein bul á liðnum við lokalum spælarum.

– Vit arbeiða í løtuni eftir eini trý ára ætlan, har vit í 2027 skulu hava eitt lið, sum hevur bitið seg fast í næstbestu deildina, sigur formaðurin í Hoyvík.

***„Vit arbeiða í løtuni eftir eini trý ára ætlan, har vit í 2027 skulu hava eitt lið, sum hevur bitið seg fast í næstbestu deildina“***

### KVINNULIÐIÐ HELDUR FRAM

Tað var lítið hugaligt hjá kvinnunum hjá FC Hoyvík at hyggja eftir stigatalvuni, tá landskappingin í Betrideildini farna kappingarár endaði.

Kvinnuliðið hjá hoyvíkingum vann bara tveir dystir samanlagt, og endaði aftast bæði í grundspælinum og í endaspælinum. Men tað hevur kortini ikki tikið mótið frá teimum.

– Vit fara aftur í ár at spæla í Betrideildini hjá kvinnum. Vit vita, at tað verður eitt trupult kappingarár og royna at fáa tveir, kanska tríggjar, spælarar inn útifrá, men tað vísur seg at verða torført. Tað er nokk bara veruleikin, tá tú hevur eitt spildurnýtt lið, ið skal byggjast upp, ásannar Fróði Danielsen.

Hann nevnir Brá Zacharisardóttir, sum er komin gjøgnum ungdómsdeildina hjá FC Hoyvík, og umvegis B36, er endað í donskum fótbólti, sum eitt dømi upp á, at tað verður gjørt nógv rætt í FC Hoyvík.

Onkuntíð verður sagt um ein fótbóltsdyst, at úrslitið var misvísandi. Tað er boðskapurin úr Hoyvík í løtuni.

# VENJINGARUMHVØRVIÐ SKAL BERA 07 VESTUR

*Tað eru broytingar og framstig á Dungasandi í Sørvági. Dan Brimsvík er settur at framtíðartryggja felagið og tað skal gerast við góðum venjingarumhvørvi. Eisini verður kvinnufótbóltur aftur at síggja í 07 Vestur*

**Hetta er fimta árið upp í slag,** at tað verður Betri deildarfótbóltur á Dungasandi. Tað var dreymurin, tá 07 Vestur í 2020 flutti upp í bestu deildini. Avbjóðingini tá var, at felagið hevði ongantíð megnað at yvirliva. Hetta hóast nógv keyp og nógvar spælarar úttanifrá.

Somuleiðis bleiv víst á, at felagið hevði góðan ungdóm, sum við tíðini fór at kunna taka yvir á besta liðnum. Hartil bleiv eitt kvinnulið meldað til, sum skuldu luttaka í Betri deildini. Tað bleiv við brasilskum íblásti.

Fimm ár seinni kann staðfestast, at bæði liðini enn eru umboðað í fremstu deildini hjá kvinnum og í fremstu deildini hjá monnum, men tað hevur ikki gingið heilt eftir ætlan. Besta mansliðið hevur enn stóran tørv á spælarum útifrá, meðan 07 Vestur ikki luttók í Betri deildini hjá kvinnum í fjør.

Nú er Dan Brimsvík settur sum høvðusvenjari hjá monnunum, og skotska Eilis McSorley er sett sum høvðusvenjari og fingið høvuðsábyrgdina av menningini av yngru spælarunum á gentusíðuni.

### VENJINGARUMHVØRVIÐ ER AVGERANDI

Eftir at hava staðið á odda fyri B36 í næstan fýra ár, bleiv Dan Brimsvík í fjørsummar settur sum høvðusvenjari hjá 07 Vestur. 37 ára gamli havnarmaðurin hevur ein part av síni venjaraupplæring í ungdómsfótbólti í Hvidovre og Lyngby í Danmark. Har arbeiddi hann við ungdómsspælarum, sum seinni eru komnir upp á besta liðið.

**„Vit skulu koma hartil, at ein ungur føroyskur spælari hevur hug at koma her, tí hann fær nakað burturúr“**

Tað er helst ein av høvuðsorsøkunum, at 07 Vestur hevur heintað Dan Brimsvík til felagið. Tað er í júst hesum aldrinum, at 07 Vestur hevur nógvar spælarar, sum felagið ynskir at fáa upp á besta liðið.

Ein kritikkur av norska Steffen Landro, sum var venjari í fyrru hálvu í fjør, var at hann ikki tók nóg stórt atlit til teir ungu lokalu spælararnar. Nú hevur felagið valt at gera nakrar fysiskar broytingar kring vøllin við tí vón, at venjingarumhvørvið verður betri.

– Vit hava gjørt eitt nýtt styrkisentur í 07 Vestur-húsinum, sum nú er eitt venjingarhús. Vit hava útvegað okkum eina kameraskipan til greining av dystum og venjingum, og venjaratoymið er sett fulla tíð. Vit vilja skapa eitt umhvørvi, har spælarar trívast og mennast. Høvuðsendamálið er at fáa lokalu spælararnar at blíva góðar, sigur Dan Brimsvík og leggur afturat:




*Dan Brimsvík, høvðusvenjari hjá 07 Vestur*



*Skotska Eilish McSorley er nyggjur høvuðsvenjari hjá 07 Vestur kvinnum*





– Innanhýsis er málið at hava besta venjingarumhvørvið í landinum. Vit skulu eisini koma hartil, at ein ungur føroyskur spælari hevur hug at spæla her, og brúka tað tíð tað tekur at koma til Sørvágs, tí hann fær nakað burturúr, sigur Dan Brimsvík.

Málið í ár er at byggja upp á, so felagið stendur enn sterkari í 2026, men venjarin vil ikki seta tal á, hvat nummar 07 Vestur skal blíva.

– Vit mugu flyta okkum sum lið og fáa stabilitet yvir alt felagið, sigur venjarin.

Ein avbjóðing verður at raka rætta lutfall millum ungar lokalar splælarar og spælarar útifrá.

– Í fjør fara vit frá kanska 10 spælarum útifrá til einar sjey. Málið er at tað við tíðini skal minka, men legg merki til, at vit gera tvey ára sáttmálar, ella sáttmálar, har vit kunnu leingja við einum ár, sigur venjarin, um spælararnar, ið koma útifrá.

Hann veit at øll vilja vinna, men leggur dent á, at í 07 Vestur snýr tað seg um at leggja afturat tí, sum er gjørt.

## FYRRVERANDI SKOTSKUR LANDSLIÐSSPÆLARI ER VENJARI

07 Vestur hevur avgjørt, at meldað felagið til bestu deildina hjá kvinnum komandi kappingarár. 07 Vestur hevði einki lið í Betri deildini hjá kvinnum í 2024, og tískil skiftu fleiri av spælarunum til onnur feløg. Men har vesturi hava tey alla tíðina havt eitt ynski um at fáa eitt kvinnulið við aftur í Betri deildina.

**„Hetta tekur tíð, og skal tískil gerast við javnari tilgongd komandi tvey árini“**

Felagið hevur tí sett Eilish McSorley sum nyggjan høvuðsvenjara hjá kvinnunum. Fyrrverandi skotski landsliðsspælarin skal eisini hava høvuðsábyrgdina av menningini av yngru gentuspælarunum.

Eftir at at hava spælt yrkisfótbólt í millum annað Glasgow City, Sassuolo og Våsterås gavst hon við yrkisfótbóltinum í 2022 og bleiv tá venjari í staðin.

Umframt UEFA B-venjaraprógv, hevur Eilish eina Bachelor í ítrótti, og har afturat hevur hon seinastu tíðina eisini havt egið fótbólts-akademi, samstundis sum hon hevur verið hjálparvenjari og høvuðsvenjari hjá FC Girvan U20 monnum.

Dentur verður lagdur á, at høvuðsvenjarin er við til at førleikamenna kvinnu- og gentufótbóltin hjá 07 Vestur sum heild, skipa førleikastig fyri ymsu aldursbólkarnar hjá gentunum, og verða við til at lyfta kvinnu- og gentufótbóltin á eitt hægri stig.

– Hetta tekur tíð, og tískil skal hetta gerast við einari javnari tilgongd komandi tvey árini, skrivaði 07 Vestur, tá Eilish McSorley bleiv sett.





# Blóð- og runudálkaðir landsliðsbúnar

*Ein føroyingur er aftur landsliðsvenjari eftir 17 árum við útlendingum í sessinum. Føroyar skulu tora at spæla fótbólt, men alt byrjar við hugburðinum, er greiði boðskapurin frá 52 ára gamla Eyðuni Klakstein*

**Sjálvan Valentinsdag** rakk romansan millum Eyðun Klakstein og Fótbóltssamband Føroya einum úrslitið. Fyrrapartin fríggjadagin 14. februar skrivaðu partarnir undir pappírini, sum siga, at klaksvíkingurin skal standa á odda fyri bestu føroysku fótbóltsmonnunum tvey tey næstu árini. Sonevnda føroyska loysnin skal standa sína roynd eftir 17 árum við útlendskum landsliðsvenjarum.

– Eg eri øgiliga fegin um, at eg eri biðin, og at vit eru spurdir um hetta. Eg haldi, at tað lá eitt sindur í kortunum nú, at tað skuldu verða føroyskir venjarar. Tí vit hava fleiri føroyskar venjarar, sum makta hesa uppgávuna, og tí at fólkið og sambandið høvdu hug at royna føroyskar landsliðsvenjarar hesa ferð, sigur Eyðun Klakstein.

– Vit hava eisini havt tíð at hugsa okkum um, tí vit vistu, at hetta var ein møguleika. Vit fingu samráðst okkum upp á pláss, og eg síggi fyri mær, at hetta fer at gangast væl.

## YIN OG YANG

Eyðun Klakstein er onnur helvtin av nýggja venjaraparinum hjá Føroyum. 52 ára gamli norðingurin tykist hóvligur, hugsanarsamur og greinandi. Atli Gregersen er hin helvtin. 42 ára gamli fyrrverandi landsliðsliðskiparin larmar munandi meir, er snarsintur, men hjálparvenjarin hevur eisini skarpan fótbóltsheila. Ein ómakað duo, sum tilsamans tykist røkka flestu tónarnar á fótbóltsklaverinum.

> **„Vit eru báðir fótbóltsmenn, sum duga at samstarva“**

– Vit eru ymiskar persónligheitir og hava ymiskar dygdir, játtar nýggi landsliðsvenjarin, sum hevur arbeitt saman við Atla Gregersen á U21-landsliðnum í tvey ár.

– Men saman hevur tað gingið væl. Vit eru báðir fótbóltsmenn, sum duga at samstarva. Atli er kanska eitt vet meir útvendur og karismatiskur. Eg havi ongar trupulleikar av at standa fram, men har hevur hann eina tonn eyka. Hann er eisini hálvur inni á vøllinum í heilum sum venjari, og tað er ein góður eginleiki. Eg eri kanska meir róligur, strategiskur og mær dámar at leggja ætlanir. Eg trívist tó eisini væl í dystarstøðum, har tú skalt agera, reagera og gera skjótt av.

## ALT BYRJAR VIÐ HUGBURÐINUM

Tað skal síggjast, at tað er eitt føroyskt landslið sum spælir. Nakað soleiðis hevur nýggi venjarin tikið til eina ella tvær ferðir, og í dystunum ímóti Armenia og Norðurmakedónia í november fingust ábendingar um, hvat liggur í boðskapinum hjá Eyðuni Klakstein.

– Vit vunnu dystin ímóti Armenia, hóast vit vóru nógv í verjustøðu. Vit eru treiskir, vit eru mótstøðuførir, megna at vera undir trýsti, standa ímóti sløgunum, geva ikki upp, hanga í.


Nýggi landsliðsvenjarin


Atli Gregersen, Christian F. Andreasen og Eyðun Klakstein






Manslandsliðið



Hetta her við skitnum klæðum og blóðblettum. Tí tú kanst gott vinna ein dyst, har nógv stendur á, og tað gjørdu vit.

Venjarin heldur kortini, at landsliðið skal tora at spæla fótbólt, men at teir fara at leggja seg eftir meir beinleiðis álopsspæli uttan ov nógvar nertingar og bóltstatiónir.

– Men alt byrjar við hugburðinum. Hvat vilja vit? Hvussu treiskir verða vit? Tað skal síggjast aftur, staðfestir Eyðun Klakstein.

### TALVAN ER REIN

Tá Eyðun Klakstein og Atli Gregersen tóku hópin út til tveir teir síðstu dystirnar í fjør, vóru onkrir spælarar ikki við, sum annars í stóran mun hava myndað landsliðið, meðan yngri spælarar fingu kjansin fyri fyrstu ferð. Landsliðsvenjarin slær fast, at talvan er vaskað rein, og eingin er vrakaður yvirhøvur.

– Dagsformur, avrik, týpur. Tað er so nógv sum spælir inn, tá tú tekur 23 spælarar út. Tað skal rigga saman, tá tú fert avstað, sigur Eyðun Klakstein.

– Vit skulu kortini yngja landsliðið so líðandi í hesum næsta tíðarskeiðnum, og tað skal gerast við skynsemi. Nakrir av teimum, sum eru í besta aldri nú, fáa kanska størri leiklut, nakrir av yngru spælarunum sleppa at snúsa til hópin, hugsi eg, og so merkir tað samstundis eisini, at onkrir í hinum endanum mugu víkja. Tað verður ein skipað tilgongd, sigur Eyðun Klakstein.

> **„Vit skulu kortini yngja landsliðið so líðandi í hesum næsta tíðarskeiðnum“**

### BEINT Í ELDIN

Nýggja venjaraparið fær ógvuliga stutt renningarlop, tí nýggja HM-undankappingin byrjar longu um ein góðan mánað. Í so máta kemur kanska væl við, at Eyðun Klakstein og Atli Gregersen longu hava staðið á odda fyri landsliðnum og ikki byrja á berum. Longu 22. mars tekur Kekkia ímóti, áðrenn leiðin gongur til Montenegro.

– Hendan byrjanin minnir kanska eitt sindur um tað, sum vit gjørdu í november. Kekkia er helst eitt sindur sterkari enn Montenegro, Norðurmekedónia og Armenia, so tað verður ein torførur dystur, men um vit koma væl frá byrjan og fáa fótin fyri okkum, kunnu vit gera okkurt óvæntað. Eg trúgvi fult og fast upp á, at vit kunnu fáa tvey góð avrik, har okkurt kanska liggur eftir til okkara, sigur Eyðun Klakstein.

Hini londini í føroyska bólkinum eru Gibraltar og annaðhvørt Kroatia ella Frankaríki, og hóast landsliðsvenjarin treyðugt vil seta tal á, heldur hann, at møguleikarnir fyri góðum úrslitum eru stórir. Dystirnir ímóti Montenegro, Kekkia og Kroatia/Frankaríki fara at líkjast, meðan uppgávan ímóti Gibraltar verður ein heilt onnur, sigur Eyðun Klakstein.

– Har mugu vit viðganga, at vit eru favorittar og skulu royna at vinna. Vit koma í leiklutin, sum nógv lond ofta hava ímóti okkum.

# Í KÍ VILJA TEY NÓGV

*Tey droyma um at koma víðari í Evropa og pleyga elituna, men tey vilja eisini fevna um breiddina og felagsskapin*

**KÍ er eitt dynamiskt felag** og tað er altíð áhugavert á Djúpumýru, tá tosað verður um lokalan fótbólt. Felagið hevur tað gott og er fíggjarliga væl fyri. Eftir trý ár, har bestu liðini hjá kvinnum og monnum hava vunnið meistaraheitið hvørt ár, er støðan broytt eitt sindur nú kappingarárið 2025 stendur fyri framman.

Hjá monnunum bleiv besta mansliðið ov stutt í Evropa og steypakappingini, men fekk silvur í landskappingini, meðan kvinnurnar hvørki komu í steypafinaluna ella vunnu meistaraheitið. Svongdin hjá teimum fremstu í Klaksvík er tí stór undan hesum kappingarárinum.

– Í Klaksvík spæla bestu liðini bara fyri at blíva nummar eitt. Tað høvdu vit kanska ikki sagt fyri tíggju árum síðani, men tað gera vit nú, sigur Tummas Lervig, formaður í Klaksvíkar Ítróttarfelag.

Áhugin er tó ikki bara fyri bestu liðunum, tí KÍ ynskir eisini at røkka breiddini frá ungdómsfótbólti til pensjónistafótbólt.

## RAÐFESTA EISINI MENNING

KÍ hevur sett sær stór mál við menning av egnum spælarum. Ynski er at fáa lokalar spælarar í gjøgnum, sum kunnu verða fyrimyndir fyri tey ungu norðanfyri.

– Eg veit at fólk hava fingið eitt sindur ilt av, at vit kalla tað fyri eitt akademi í Klaksvík, men vit gera bara tað sama, sum vit altíð hava gjørt, undir meira skipaðum viðurskiftum, sigur Tummas Lervig um ungdómsarbeiðið.

**_„Í Klaksvík spæla bestu liðini bara fyri at blíva nummar eitt. Tað høvdu vit kanska ikki sagt fyri tíggju árum síðani“_**

Tað hevur verið ein ávísur kritikkur av KÍ, at felagið ikki setur sínar egnu við, men formaðurin hevur hug at vísa á allar topp-spælararnar, ið eru komnir úr Klaksvík.

– Vit hava ment spælarar sum Toda Jónsson, Jákup Mikkelsen, Rógva Jacobsen, Mørkøre-beiggjarnar og aðrar toppspælarar, vit hava ment fleiri spælarar til besta liðið og til breiddina, men vit kunnu ikki seta við, um vit ikki hava spælararnar, sigur Tummas Lervig.

Í KÍ er ynski at halda fram við menningin av ungu spælarunum, so tað til komandi tíðina verða fleiri, ið kunnu taka lopið upp á besta liðið hjá bæði kvinnum og monnum.

– Langtíðararbeiðið í ungdómsdeildunum fer at síggjast fyrr ella seinni. Vit hava góðar venjarar og góð hjálparfólk, og við Másheyggi hevur felagið fingið ein vøll afturat at venja á, sigur formaðurin.

KÍ er í tøttum samstarvið við Treysti um brúk av nýggja vøllinum og vónin er, at tey sum spæla á heilum vølli skjótt kunnu spæla sínar dystir har eisini.

Krøvini fyri at koma í gjøgnum hjá KÍ eru herd, nú felagið er á tindunum og spælir fyri at koma víðari í Evropa.




*– Tað er nógv at arbeiða við, men sum heild havi eg góðar vónir til kappingarárið, sigur Páll A. Klettskarð*



– Í øllum hesum mást tú eisini minnast til, at vit hava fýra ungar spælarar, sum eru útleigaðir til onnur feløg. Vónin er, at teir fáa sítt gjøgnumbrot og kunnu koma aftur til KÍ og spæla, sigur formaðurin hjá teimum kongabláu.

Hann veit væl, at tað eru nógvar meiningar um KÍ í lokalumhvørvinum, men gleðist bara um at tað er so stórur áhugi fyri felagnum.

### Í MEÐAN VIT BÍÐA

Meðan vit bíða eftir teimum ungu, hevur KÍ millum annað heintað tríggjar spælarar úr Argentina. Talan er um 24 ára gamla miðverjan, Gaston Nicolas Telechea, 21 ára gamla miðvallaran, Martin Rodrigo Gonzalez, og 20 ára gamla áleyparan, Tobias Fabian Guisti. Teir eru komnir hendan vegin við viðmæli frá fyrrverandi danska venjaranum, Ova Christensen, ið eisini hevur arbeitt fyri føroyska manslandsliðið.

– Hetta er nakað, sum venjaratoymið hevur ynskt og vit síggja ein møguleika, at fáa hesar spælararnar víðari. Tað er dýrt at keypa dygd, men hesir hava víst ein vilja at koma til Føroyar at spæla, sigur Tummas Lervig.

> **„Vit hava lagt 2024 afturum. Í 2025 fara vit eftir at vinna alt, sum vinnast kann"**

KÍ hevur eisini sett svenska Magnus Powell sum venjara, sum í fyrru hálvu í 2021 hevði ábyrgdina av 07 Vesturi.

– Vit hava fingið eitt nýtt venjaratoymi, nýggjar spælarar, og eina nýggja tilgongd til tingini. Tað er nógv at arbeiða við, men sum heild havi eg góðar vónir til kappingarárið, sigur Páll A. Klettskarð, sum bleiv toppskjútti í landskappingini í fjør.

### KVINNURNAR VILJA AFTUR Á TOPPIN

Fyri besta kvinnuliðið bleiv árið í fjør eitt sindur rokaligt. Eitt venjaraskifti, ein tapt fjórðingsfinala í steypakappingini og eitt silvurheiðursmerki í landskappingini.

– Vit hava lagt kappingarárið 2024 afturum okkum. Í 2025 fara vit eftir at vinna alt, sum vinnast kann. Tó hevur meistaraheitið og atgongumerkið til Champions League størst týdning, sigur Sanna Svarvadal, liðskipari hjá KÍ.

Fótbóltsfelagið hjá norðoyingum hevur seinnu árini lagt enn meira fyri við venjing hjá kvinnunum, og fleiri ungir spælarar við góðum eginleikum eru á veg. Nýggjur venjari er Allan Dorst, Maria Klakkstein Thomsen er aftur í hópinum, meðan Rannvá Biskopstø Andreasen, ið hevur verið ein av berandi kreftunum, nú er í venjaratoyminum.

So er spurningurin bara, nær tað aftur verður gullveitsla í Klaksvík?




KLAKSVÍKAR
KOMMUNA

Eitt ítróttaøki
í heimsflokki



www.itrottadepilin.fo

# EVROPA- OG LANDSLIÐS-DÁMUR VIÐ LØKIN

*Kvinnurnar vunnu greipuna og skulu spæla í Champions League. Mansliðið er endurreist og kom í Evropa. Hartil verður Brandur Hendriksson at síggja við Løkin komandi kappingarár*



Petur Knudsen, Jann Benjaminsen og Brandur Hendriksson

**Tað var ein myrkur dagur** í søguni hjá NSÍ, tá fremsta manslið hjá felagnum á seinasta leikdegi í 2022 flutti niður í næstbestu deildina. Síðani hevur Nes Sóknar Ítróttarfelag lagt á annan bógv. Við góðari hjálp frá nærumhvørvinum eru fíggjarligu viðurskiftini komin upp á pláss, og felagið er í holt við at endurreisa stoltu ungdómsdeildina, við Karstin Joensen, sum tók við formanssessinum stutt eftir at niðurflytingin var staðfest, á odda.

– NSÍ hevur tað gott. Fíggjarliga eru vit væl fyri, vit hava nógvar limir og met nógvan ungdóm. Vit løgdu nýggja strategi, tá vit komu til fyri tveimum árum síðani, og henni fylgja vit enn, sigur formaðurin.

Tað skert ikki burtur, at NSÍ sigldi í tungum sjógvi eftir lagnudagin móti B68 fyri hálvum triðja árið síðani. Hetta er ikki fyrstu ferð, at besta mansliðið hjá NSÍ er flutt niður. Í 90'unum var NSÍ kent sum eitt elevatorlið, ið skiftivís flutti upp og niður millum bestu og næstbestu deildina. Við nýggjari nevnd og nýggjari orku er skútan hjá NSÍ aftur á rættari leið.

**„Vit løgdu nýggja strategi, tá vit komu til fyri tveimum árum síðani, og henni fylgja vit enn“**

– Tá vit komu til vóru tað sjey troytt fólk, men í dag sært tú kanska eini 50 fólk, sum deila uppgávurnar í felagnum og eru optimistisk. Tað er ein fortreyt fyri at gera tað, sum vit gera nú, at vit hava nógv fólk, sum leggja orku í felagið, sigur Karstin Joensen.

Ungdóms-landsliðsspælararnir síggjast nú aftur við Løkin í Runavík, og ungdómsarbeiðið í NSÍ er lagt í eina fasta legu.

## BRANDUR HENDRIKSSON SPÆLIR Í GULUM

NSÍ brast eina sanna bumbu, tá felagið kundi kunngera Brand Hendriksson Olsen sum nýggjan spælara við Løkin. Við einum trý ára sáttmála hevur hann fylgt í fótasporunum hjá Peturi Knudsen, sum í fjør vendi heim at spæla. Báðir teljast teir millum mest spennandi fótbóltsspælararnar í landinum í løtuni.

– Brandur er forlovaður inn í hjartað á NSÍ. Har hoyrdu vit, at hann lat hurðin upp fyri at koma heim at spæla. Vit tosaðu við hann fleiri ferðir og spurdu hvat skuldi til. Eins og Petur Knudsen,







Allan Dybczak, høvuðs-venjari hjá NSÍ-kvinnum



Karstin Joensen, NSÍ-formaður



so setur hann nøkur ítróttarkrøv til okkum og tað er gott. Síðani settu vit ein pakka saman, sum hann kundi liva við, greiðir formaðurin hjá NSÍ frá.

Brandur Hendriksson segði sjálvur við Kringvarp Føroya, at NSÍ var tað felagið sum vísti størst áhuga. Eftir næstan 14 ár sum yrkisspælari metir 29 ára gamal skálvíkingurin, at tað kennist rætt at flyta heim til føroyskan fótbólt nú.

– Tað er ikki nøkur lætt avgerð at flyta heim, tá tú hevur spælt uttanlands so leingi, men eg havi tosað við foreldur, vinir og unnustuna. Tá tað kom til stykkis, so føldist hetta rætt, sigur Brandur Hendriksson.

Skiftið kemur at varpa nógv ljós á NSÍ, men formaðurin letur seg ikki ríva við.

– Vit eru ambitiøs í NSÍ og vit vilja halda fast í Evropa-plássinum. Men vit vita eisini at tað eru trý feløg, sum í løtuni eru betri enn vit. Vit arbeiða móti toppinum, men ongin fær meg at siga, at vit eru FM-biðlar í ár, sigur Karstin Joensen.

NSÍ bleiv nummar fýra í fjør og skal spæla í Evropa komandi kappingarár.

## CHAMPIONS LEAGUE FÓTBÓLTUR

Meðan menninir skulu spæla í UEFA Europa Conference League, so skulu kvinnurnar hjá NSÍ spæla í UEFA Champions League í ár. Tað er vinningurin fyri at vinna fyrstu greipuna í søgu felagsins, men hetta kemur eisini at seta krøv til hópin og venjaran, Allan Dybczak.

**„Vit arbeiða móti toppinum, men ongin fær meg at siga, at vit eru FM-biðlar í ár“**

– Munurin er, at í fjør fingu vit planlagt nokkso væl hvussu vit skuldu sleppa undan at spælarar blivu mentalt troyttir, við pausum frá venjingum, og so nær vit skuldu toppa fysiskt. Vit hava eina ætlan, men tað krevur nógv meira av okkara spælarum enn tað hevur fyrr, sigur venjarin hjá besta kvinnuliðnum við Løkin.

Hann vónar at liðið heldur fast í samleikanum og leggur afturat, og at tað framvegis verður torført hjá hinum at spæla móti NSÍ.

Á leiðslugongini er Champions League fótbóltur hjá kvinnum ein spennandi avbjóðing – men tað er eisini ein fíggjarlig avbjóðing.

– Tær hava vunnið sær ein heiður, og tann heiðurin skulu tær sleppa at uppliva. Vit fara at seta okkum saman og finna útav hvussu vit kunnu tryggja, at tær sleppa avstað, sigur Karstin Joensen.

Hann heldur lítið um, at pengar ikki fylgja við Champions League luttøkuni hjá kvinnunum, eins og tað ger hjá monnunum.

Hetta er aðru ferð í søguni hjá NSÍ, at felagið skal spæla Champions League. Fyrru ferð var í 2008, eftir at menninir vunnu FM árið fyri.

# Runavíkar kommuna ynskir NSÍ bestu eydnu við kappingarárinum 2025



RUNAVÍK NSÍ 1957 FOOTBALL CLUB

RUNAVÍKAR KOMMUNA

# Høgni gleðir seg at døma

*Høgni Madsen er ein av dómarunum, sum er á veg fram í løtuni. Hann hevur sjálvur spælt nógv fótbólt og vónar, at kunnu brúka royndirnar sum spælari í dómarabúnanum. Hetta er fimta árið sum dómari*


*Høgni Madsen, dómari*

**Høgni Madsen er nokk** best kendur sum stríðsmaðurin á miðjuni, ið ikki var bangin fyri at fara í eina takling. Eftir at hann legði skógvarnar á hillina í 2021, hevur hann verið dómari. Nú skal fuglfirðingurin í holt við sítt fimta ár, og líkt er til at hann skal døma enn fleiri dystir í Betrideildini hjá monnum, har hann eisini hevur spælt nógvar dystir.

Í fjør fekk hann nevniliga debut sum dómari í bestu mansdeildini, tá hann í 25. umfari dømdi dystin millum HB og 07 Vestur. Tað endaði við einum 1-0 sigri til HB við máli, sum Sammy Skytte skoraði eitt korter fyri tíð.

– Tað var nakað heilt serligt, at fáa mín fyrsta dyst í bestu deildini. Eg havi nú upplivað hvussu heilt ótrúliga torført tað er at døma. Hvør dystur krevur hundrað prosent fokus, ella gongur tað galið, men tað er eisini tað, sum ger uppgávuna spennandi, sigur Høgni Madsen, ið tríggjar ferðir er kosin til ársins dómara í Betrideildini hjá kvinnum.

Sum spælari hevur Høgni Madsen umboðað ÍF, GÍ, NSÍ, EB/Streym, B68, KÍ, FC Suðuroy og B36, og harafturat hevur hann eisini roynt seg í maltesiskum og íslendskum fótbólti. Spurningurin er so, um tað er ein fyrimunur, at hava so nógvar royndir sum spælari?

**„Hvør dystur krevur hundrað prosent fokus“**

– Tað mugu onnur døma um. Vit hava havt, og hava enn, nógvar góðar dómarar, sum ikki hava spælt sjálvir. Teir hava hava kanska fingið fyrimunir av sínum sivila starvið, ella at teir hava dømt í nógv ár, sigur fyrrverandi miðvallarin, sum leggur afturat:

– Eg kann bara siga fyri meg, at eg má brúka tær royndirnar eg havi. Eg royni eisini at seta meg í støðuna hjá spælarunum, tá eg dømi. Tað kann verða ein fyrimunir at hava verið fyrrverandi spælari tá, men tað ger meg ikki til ein betri dómara enn nakar annar.

Hann hevur ikki beinleiðis sett sær nakað mál fyri komandi kappingarár, men vónar at tað verður bæði spennandi og stuttligt við fleiri góðum fótbóltsdystum.

### EG ÆTLI MÆR AT NJÓTA TAÐ

Tú ert mitt í andglettinum, tá tú ert dómari. Tað veit Høgni Madsen væl, og tí fyrireikar hann seg eisini væl til komandi kappingarár.

– Hetta hava verið nøkur lærirík ár. Eg havi lært, at tú skal fyrst og fremst vera væl fyri. Tú skal eisini vera mentalt klárur. Eg royni altíð at tosa nógv við hjálpardómararnar og leggja eina ætlan fyri hvønn dyst, greiðir Høgni Madsen frá.

Sum spælari hevur hann eisini roynt at spælt við í týðandi dystum, og hóast týstið kann verða stórt og tað hendir nógv rundanum teg, so snýr tað seg eisini um at njóta løtuna.

– Eg ætli mær at fara út á vøllin og njóta at døma, og annars bara gera tað so gott sum eg kann, sigur Høgni Madsen, um komandi kappingarár.

### HAVA BRÚK FYRI FLEIRI SUM HØGNA

Tað kemur væl við hjá Fótbóltssambandi Føroya og teimum, ið umsita dómararnar, at ungir dómarar sum Høgni Madsen vinna fram. Ein av stóru avbjóðingunum er at fáa nýggjar og ungar dómarar at taka við, og í tí sambandi skipar FSF javnan fyri dómaraskeiðum.

– Vit hava brúk fyri fleiri dómarum, og arbeiða tískil alla tíðina við og kanna ymsar møguleikar, hvussu vit kunnu fáa fleiri dómarar. Tá er gott við dugnaligum og ídnum instruktørum, ið brenna fyri dómarayrkinum, sigur Lassin Isaksen, dómaraleiðari hjá Fótbóltssambandi Føroya.

Hvørt vikuskiftið er brúk fyri millum 80 og 90 dómarum og hjálpardómarum til fremstu deildirnar hjá kvinnum og monnum, umframt U21.

– Tá samlaða mongdin av dómarum ikki er nógv meira enn tað, mugu onkrir dómarar átaka sær at vera partur av tveimum dystum okkurt umfar. Hetta er sjálvandi ikki nøkur ynskistøða, men við góðum samstarvi við feløgini fáa vit tað at hanga saman, leggur Lassin Isaksen afturat.

**„Eg royni at seta meg í støðuna hjá spælarunum“**

### VAR TIL FØROYA Í 2026

Arbeitt verður fram ímóti, at frá kappingarbyrjan 2026 fer VAR at verða nýtt í Betrideildini hjá monnum, og partvís í kappingini um Løgmanssteypið.

– Vit hava arbeitt við hesum møguleika í eina tíð, og eftir ætlan fara vit at gera nakrar royndir í ár, og so taka vit VAR av álvara í brúk tá kappingin í 2026 fer í gongd, sigur Lassin Isaksen.

Væntandi verður VAR nýtt í einum dysti í hvørjum umfari í fremstu deildini hjá monnum, og partvís í kappingini um Løgmanssteypið. Og tá kappingin er liðug, hava øll liðini spælt eins nógvar dystir við VAR.

– Fyri skjótt tveimum árum síðani gjørdu vit eina roynd, har tvey ungdómslið hjá HB spældu dyst á Tórsvølli, og føroysku dómararnir, ið dømdu dystin, fingu møguleikan at royna VAR útgerðina. Tað eydnaðist so mikið væl, at vit beinanvegin avgjørdu, at arbeiða víðari við hesi ætlan, ið nú nærum er komin á mál, sigur Lassin Isaksen at enda.

# TB ER AFTUR Í FREMSTU RØÐ

*Við sigri á útivølli móti FC Hoyvík, á síðsta leikdegi farna kappingarár, tryggjaði Tvøroyrar Bóltfelag sær uppflyting til bestu deildina aftur, eftir stuttan steðg í 1. deild*

**Tað stóð nógv á** tvøramonnum og øllum TB viðhaldsfólkunum, ið høvdu leitað sær til Hoyvíkar, tá 27. og síðsta umfar í næst fremstu deildini hjá monnum varð spælt eitt kalt fríggjakvøld seint í oktobur mánað í fjør.

Í harðari kapping við sandoyingar, stríddust teir á TB liðnum fyri at vinna sær hitt plássið, ið gav rætt til uppflyting til Betrideildina. Og leingi sá út til, at tað fór at verða B71, ið dróg longra stráið. Í Klaksvík var B71 á odda móti KÍ, samstundis sum tað framvegis var málleyst á Hoyvíksvøllinum, har rættuliga nógv fólk var komið saman.

Men tá eitt gott korter restaði í av dystinum millum FC Hoyvík og TB bragdaði endiliga hjá tvøramonnum. Dómarin peikaði á brotssparksblettin, og úr ellivu metrum tók Samudeen Musah ábyrgd. Ganabúgvin sveik ikki álitið, men tryggjaði hinvegin TB ein kærkomnan 1-0 sigur á hoyvíkingum, sum í staðin máttu tungu leiðina niður í 2. deild.

Hýrurin var av tí sama ógvuliga góður, tá Smyril seinni hetta fríggjakvøldið setti kós ímóti Krambatanga. TB var aftur í fremstu røð.

**„Tað er ongin loyna, at styrkur má til, men ikki ein og hvør. Tað er umráðandi at profilurin er tann rætti“**

## FYRIREIKINGARNAR BYRJAÐU TÍÐLIGA

Liðið hjá tvøramonnum hevur ment seg til at vera eitt sterkt verjulið, sum er væl skipað, men ofta hevur tað verið heldur soltin úrtøka í álopspartinum, og sambært roynda TB leikaranum, Gilla Rólantsson Sørensen, so er tað júst á tí økinum, at aldursforsetin í føroyskum fótbólti má royna at menna seg fyri at standa seg í herdu kappingini uppi í bestu deildini.

Longu tríggjar vikur eftir at kappingin endaði í 1. deild í fjør, byrjaðu Gilli og hinir TB leikararnir at fyrireika seg til hetta kappingarárið, sum nú stendur fyri framman.

Roynditi verjuskansin metir TB vera sera væl fyri í verjupartinum, men ásannar, at tað í álopspartinum nokk má styrkjast eitt sindur.

– Tað er ongin loyna, at styrkur má til, men ikki ein og hvør, sigur Gilli Sørensen, og leggur afturat, at tað er umráðandi at profilurin er tann rætti, og at hesin passar saman við leikarunum, sum longu eru at finna við Stórá í Trongisvági.




*– Nógvir ungir eru á veg, og hesir skulu venja seg við at pressa seg fult og heilt, og flyta síni mørk, sigur Gilli Rólantsson Sørensen*







### NAKRAR BROYTINGAR Í HÓPINUM

Leikarar sum Nikolei Johannesen, Einar Thorsteinsson og Musah Armah eru ikki við í ár, og tí má TB til at finna avloysarar. Har eru nógvir ungir og evnaríkir leikarar sum eisini fingu møguleikan í fjør, tá hesir fyrr umrøddu ikki vóru við í seinnu hálvu av kappingini. Hesir fáa aftur møguleikan til at vísa sítt virði í ár, og tað verður spennandi at fylgja menningini hjá teimum.

### EIN VENJINGARMENTAN SKAL STYRKJAST

– Eg havi tosað nógv um eina sunna mentan í Tvøroyrar Bóltfelag, eina sterka felagskenslu, og hetta skal byggjast víðari á. Nógvir ungir eru á veg, og hesir skulu venja seg við at pressa seg fult og heilt, og flyta síni mørk.

***„Eitt felag sum Víkingur er veruliga ein fyrimynd hjá okkum“***

Tað er hetta vit ynskja at uppala, og tað er hetta vit ætla framyvir, sigur Gilli Róilantsson Sørensen, sum kom heim at hjálpa TB við at byggja felagið upp aftur av nýggjum.

### LOKALIR LEIKARAR SKULU VERA BULURIN

– Eitt felag sum Víkingur er veruliga ein fyrimynd hjá okkum, staðfestir stóri verjuprofilurin, Gilli Rólantsson Sørensen, og sigur víðari, at dúvast skal í størstan mun á lokalar leikarar, og tað er týdningarmikið at vera trúgvur móti høvuðsætlanini, og at man ikki loypir framav.

– Vit skulu halda okkum til ætlanina, og dríva á, sigur Gilli, sum enn ikki hevur slept tankanum um at umboða landsliðið aftur.



TVØROYRAR KOMMUNA

YNSKIR TVØROYRAR BÓLTFELAG EITT GOTT KAPPINGARÁR



# ELISABETH STAÐIÐ Á ODDA Í ÁTTA ÁR

*Hon skuldi bara á ein aðalfund at takka fyri seg, men er nú millum longst sitandi forfólkini í føroyskum fótbólti*

**Eliasbeth Haraldsen** fekk eini boð við frá sjeikinum, tá hon fyri átta árum síðani fór á aðalfund hjá Miðvágs Bóltfelag. Tey vóru í holt við at byggja hús og eftir tvey ár í nevndini, var tíðin komin at hugsavna seg um familju og húsabygging. Hon kom heim aftur sum forkvinna í MB, og har situr hon enn. Átta ár seinni.

– Hatta hava vit mangan flent eftir, sigur Elisabeth Haraldsen í dag.

Hon angar ikki eina løtu, at hon í tveimum førum tók eina spontana avgerð á aðalfundi hjá MB. Fyrra ferðin var fyri tíggju árum síðani, tá hon kom í nevndina á fyrsta sinni. Mansliðið hevði klárað seg lutfalsliga væl og skuldi hava nýggj klæðir. Tað helt Elisabeth eisini at kvinnuliðið skuldi hava.

– Tá segði onkur við meg, at eg kundi bara koma í nevndina og gera tað. Tað var als ikki gjøgnumhugsað og bara ein spontan avgerð, fortelur Elisabeth Haraldsen.

Tað er tvey ár seinni, at sjeikurin gevur henni ráðini um at gevast, men aftur tekur spontaniteturin yvir.

**„Tað vil eg gjarna geva víðari til tann næsta, sum vil standa á odda fyri Miðvágs Bóltfelag“**

– Tað var eisini av tilvild. Øll nevndin var nýggj og eg var tann einasta við royndum, tí eg hevði sitið í tvey ár framman undan. Tey í gomlu nevndini søgdu, at eg kundi heita á tey í sambandi við ivamál, og so tók eg við, fortelur Elisabeth Haraldsen brosandi.

Elisabeth flytir eftir ætlan av landinum í summar og hevur boðað frá, at hetta verður hennara seinasta ár sum forkvinna. Hon vónar at onkur bjóðar seg fram at taka hennara pláss, sum hon so síðani kann læra upp.

– Eg haldi at tú skalt ikki sita ov leingi í sama stað, tí so stagnerað alt. Eg veit eisini hvussu torført tað er at koma í ein fótbóltsnevnd at byrja við. Alt er nýtt og tað er nógv at seta seg í, men eftir eitt ár ella tvey, so sært tú mynstrini og byrjar at skilja hvussu alt hongur saman. Tað vil eg gjarna geva víðari til tann næsta, sum vil standa á odda fyri Miðvágs Bóltfelag, sigur Elisabeth Haraldsen, og leggur samstundis afturat, at tað er bæði spennandi og mennandi at verða partur av eini fótbóltsnevnd.





Elisabeth Haraldsen, forkvinna í MB

## FRAMGONGD OG AVBJÓÐINGAR

Í 2023 gjørdi FSF eina broyting, har millum annað MB bleiv flutt upp í 2. deild og var tryggjað móti niðurflyting, so leingi liðið møtti til dystirnar. Fyrsta árið kendist hart og besta mansliðið var ikki heilt fyrireikað til uppgávuna og fekk bara seks stig, harav trý móti FC Hoyvík, sum ikki møtti til dyst. Í fjør gekk væl betri og liðið fekk 15 stig.

– Vit høvdu áleið sama lið, men úrslitini vóru nógv betri. Ongin er nøgdur við at enda aftast, men eg eri nøgd við framgongdina í spæli og í stigum. Eg vóni, at mansliðið heldur fram við sama arbeiðslagi og góða stemninginum sum í fjør, sigur forkvinnan.

Men hon ásannar eisini, at tað verður eitt trupult kappingarár í ár, nú næstbesta liðið hjá HB er at finna í triðjbestu deildini.

– Tað er ringt at seta sær eitt beinleiðis mál um, hvar vit skulu enda. Í fjør spældu vit millum annað móti Royn, sum er í somu støðu sum vit, meðan vit í ár skulu spæla móti eykaliðnum hjá HB, sigur Elisabeth Haraldsen, nú Royn er tvangsniðurflutt til 3. deild, tí felagið ikki møtti til fleiri dystir í fjør.

## STRÍÐAST Í UNGDÓMSDEILDINI

MB, sum bleiv sett á stovn í 1905, er millum elstu feløgini í landinum, men samstundis eisini millum tey minstu feløgini. Miðvágur liggur millum bygdirnar, ið manna 07 Vestur og tað er ójavnt hvussu stevið er. Í fjør var samstarv við 07 Vestur um nøkur av ungdómsliðunum, men tað stendur ikki við í ár. Av tí sama væntar forkvinnan at tað verða færri lið tilmeldaði í ár enn í fjør.

**„Vit mugu finna útav, um teimum smáu skal vera lív lagað“**

– Hetta stendur fyri mína perónligu rokning, men eg haldi ikki at samstarvið við 07 Vestur nakrantíð hevur riggað. Vit hava samstarvað um gentuliðini frá U11 til U16, men tað dettur niðurfyri og tíverri detta spælarar eisini niður í millum nú, sigur forkvinnan.

Hon sóknast eftir einum plássi til MB í føðiketuni, nú fíggjarliga grundarlagið frá FSF er broytt til hvussu besta mansliðið klárar seg, heldur enn tilmelding av liðnum og ungdómsspælarum.

– Vit mugu finna útav, um teimum smáu skal vera lív lagað. Tað at veksa upp og spæla við lokala liðnum, ella um alt skal samlast hjá teimum stóru feløgunum. Kanska skulu vit fara til ein leist, har tey smáu bara eru undirfeløg og koyra spælarar víðari, og tey stóru so stuðla teimum smærru við venjarum og útgerð, sigur Elisabeth Haraldsen.

Hon heldur, at tað er týdningarmikið at tey smærru feløgini halda fram at virka.

– Eitt felag, sum hevur klárað at hildið seg flótandi í 120 ár, má hava grundarlag fyri at halda fram at virka. Her má vera okkurt gott. Eg vildi ynskt, at fleiri hugdu inn til okkum í MB uttan at niðurgera okkum. Sjálvt um vit ikki hava eitt glasiligt hús ella umstøður, so eru vit nøkur sum vilja fótbóltinum væl, sigur Elisabeth Haraldsen at enda.





# HALDA FAST Í LOKALA LEISTINUM

*Alt er broytt rundanum FC Suðuroy, sum annað árið á rað er flutt upp, og nú skal spæla í fremstu deildini hjá monnum. Men leisturin verður tann sami, sigur formaðurin*

**– Støðan er tann sama** sum í fjør. Hópurin er tann sami, nevndin er tann sama, men vit eru bara eina deild hægri. Tað sigur Eyðbjørn Thomsen, formaður í FC Suðuroy.

Í fjør var FC Suðuroy uppflytari í næstbestu deildini. Bæði Dánjal Godtfred, sum vendi heim aftur til barndómsfelagið at spæla, og formaðurin, tosaðu í fyrstu atløgu um at yvirliva.

– Koma vit nakað inn í kappingina og liggja væl fyri á stigatalvuni, so snýr tað seg um at fara eftir uppflytingini, segði Dánjal Godtfred tá.

Tað endaði við uppflyting. Svarið hesa ferð snýr seg meira um at yvirliva.

– Málið er at vinna okkum sætið í deildini í 2026 eisini. Eg veit at nøkur halda hetta verið eitt trupult mál at røkka, men vit fara undir øllum umstøðum at gera eina roynd, sigur Dánjal Godtfred undan kappingini í ár.

– Vit fara ikki at keypa okkum eitt pláss í Betrideildini. Tað hava vit roynt fyrr og tað riggaði ikki, sigur formaðurin.

**„Vit fara ikki at keypa okkum eitt pláss í Betrideildini. Tað hava vit roynt fyrr og tað riggaði ikki“**

## LEISTURIN VERÐUR LOKALUR

Tað er ikki ókent, at uppflytarar hava styrkt sær liðið við nógvum spælarum útifrá, í eini roynd at yvirliva í bestu deildini. Tann leistin hava tey eisini roynt á Eiðinum í Vági, men við blandaðum úrslitum.

– Vit mugu hava nakað av tilgongd, men málið er at brúka lokalar spælarar. Tað krevur nógva tíð og pengar at keypa útifrá, og tá veist tú ikki hvat tú fært av dygd. Vit hava brent okkum fyrr, fortelur formaðurin, Eyðbjørn Thomsen.

Støðan er lík henni í fjør, tá FC Suðuroy flutti upp úr 2. deild – nú bara í eini deild hægri. Formaðurin sigur, at tað verða í mesta lagi keyptir tveir ella tríggir spælarar útifrá.

– Betrideildin er nógv harðari fyri okkara spælarar enn 1. deild. Hópurin er smalur og vit kunnu fáa skaðar og leikbann. Vit hava eisini tosað um at keypa fleiri inn, men tað hava vit valt ikki at gera, sigur formaðurin.




Eyðbjørn Thomsen, formaður í FC Suðuroy




*Dánjal Godtfred, FC Suðuroy*

Eyðbjørn Thomsen viðgongur, at tað kann koma fyri, at liðið kemur at tapa onkran dyst stórt, men trýr upp á at tað ber til at bjarga sær einum plássi í fremstu deildini hjá monnum.

– Vit taka úrslitini sum tey koma. Eg vænti eisini, at vit fara at skapa okkurt óvæntað úrslit og eg dugi ikki at síggja, at vit ongan kjans skulu hava at yvirliva.

Fyri Dánjal Godtfred er vónin, at tað verður stuttligt at spæla. Tað merkir bæði, at liðið klárar seg væl, men eisini at hann sleppur undan skaðum.

– Persónliga er størsta málið, at vera partur av einum FC Suðuroy liði, ið kemur at spæla fótbólt, sum er stuttligur at hyggja eftir, umframt at vit vera við í kappingini um at halda okkum í deildini, og at eg kann halda meg skaðafrían, sigur miðvallarin.

Hann er 28 ára gamal og hevur royndir úr Betrideildini við FC Suðuroy, TB, TB/FCS/Royn og EB/Streymi. Sum ein av royndastu spælarunum verður tað upp til hann at geva av sær til teir ungu á liðnum.

## STANDA Á EGNUM BEINUM

Ein broyting verður í FC Suðuroy til komandi kappingarár. Samstarvið um besta kvinnuliðið í Suðuroynni heldur ikki fram. FC Suðuroy hevur hildið saman við TB og Royn, men tað stendur ikki við.

***„Alt frá at pumpa bóltar til at útskriva loyvir“***

– Tað stutta av tí langa er, at ov fáar hava bundið seg til at spæla í Betrideildini eitt heilt kappingarár. Tí fara vit at standa á egnum beinum í 1.deild og vóna, at hava eitt lið aftur í bestu deildini um trý ár, boðar formaðurin frá.

Eitt av avgerandi punktunum fyri at fara upp í bestu deildina var, at liðini í 1. deild vóru so vánalig at møta til dyst á Eiðinum. Her verður víst á, at í U16 møta øll liðini og tí fáa meginparturin av spælarunum á liðnum nógvar dystir, men ynski er sjálvandi at hini 1. deildarliðini eisini møta til landskappingardystir í Vági.

Ein onnur avbjóðing er, at bestu ungu spælararnir mugu norðurum at spæla í Betri deildini. Tað er ábendingar um, at tað aftur kemur at merkjast í FC Suðuroy.

Felagið fer tó framhaldandi at hava samstarv við TB og Royn um U15 og U17 hjá dreingjum. Eitt samstarv, ið hevur riggað væl seinnu árini.

## UPPFLYTING SETUR STØRRI KRØV

Tað eru væl størri krøv til umsiting og umstøðurnar, tá eitt felag skal spæla í bestu mansdeildini. Hetta merkist eisini vesturi á Eiðinum í hesum døgum.

– Tað eru avbjóðingar, tá tú hevur eitt lítið felag, har nevndin ger alt frá at pumpa bóltar til at útskriva loyvir. Vit umhugsa at seta fólk í starv. Sum er hava vit samskiparar og tveir høvuðsungdómsvenjara, so umstøðurnar eru á eini leið. Tað er eisini eitt kupp at hava Marghøllina at venja í um veturin, men nú kundu vit hugsað okkum ljós við vøllin, sigur formaðurin í FC Suðuroy, Eyðbjørn Thomsen at enda.






Góða eydnu

Vágs Kommuna ynskir FC Suðuroy bestu eydnu í kappingarárinum 2025

VÁGS KOMMUNA

# 2025 VERÐUR EISINI LJÓSABLÁTT

*2024 var eitt gott ár hjá teimum ljósabláu Víkingunum. Kvinnurnar komu í steypafinaluna og eftir fleiri ár aftanfyri toppliðini, kappaðust tær í fjør um gullið í landskappingini. Menninir vóru sannførandi og vunnu FM, og gjørdi tað, sum fyri summi var óvæntað. Men eftir eina góða gongd í longri tíð, so var tað ikki so óvæntað kortini*

**– Eftir at vit endaðu 2023** við at vinna 14 dystir á rað, og eftir ein góðan uppstart, so høvdu vit sjálvandi gott mót uppá kappingarárið 2024. Men eg haldi, at vit fóru bara í gongd við kappingina dyst fyri dyst, uttan at vit hugdu alt ov langt inn í framtíðina. Tað sigur Arnbjørn Svensson, sum í fjør var millum stinnastu verjuleikararnar í Betrideildini.

Fótbóltsárið byrjaði væl, og tíðliga í kappingini løgdu teir ljósabláu seg á odda. Hóast eina góða byrjan, so fóru Arnbjørn og hinir úr Víkingi ikki á flog.

– Sjálvandi er málið hjá okkum altíð at vinna, men vit vistu sjálvandi eisini, at tað var eitt sindur upp til KÍ. Men vit hava lagt afturat okkara spælið ár fyri ár, so vit trúðu heilt víst uppá, at vit kunnu vinna føroyameistaraheitið.

### VILJA ENDURVINNA FM

Hóast eitt sannførandi meistaraheitið, er svongdin hjá Arnbjørni og hinum víkingunum til meira gull framvegis stór.

**„Vit fara sjálvandi eftir at endurvinna FM“**

– Vit fara sjálvandi eftir at endurvinna FM, hóast vit vita at tað verður sera torført. Eisini ætla vit at koma so langt sum gjørligt úti í Evropa, har dreymurin sjálvandi er at spæla okkum í eitt deildarspæl. Vit vita væl, at hesi bæði málini eru torfør, men vit hava nú víst, hvussu góðir vit eru í nøkur ár, so um hópurin verður nøkulunda tann sami, og vit eru hepnir við skaðum og øðrum, so trúgva vit fult og fast uppá, at hetta væl kann bera til.

Víkingur hevur við góðum ungdómsarbeiði og sterkum felagsskapi gingið á odda, og víst, at tað ber til at vinna eitt føroyameistaraheitið, har størsti parturin av hópinum er lokalur. Hetta hava feløg úr øðrum londum sæð, og tí er eisini áhugi fyri teimum bestu leikarunum. Eitt nú er evnaríki miðvallarin Geza David Turi seldur til enska felagið Grimsby.



*Arnbjørn Svensson, Víkingur*



*Jensa Kannuberg Tórolvsdóttir, Víkingur*

Men hóast frágongd og útlendskan áhuga fyri leikarunum, so er Arnbjørn tó vónríkur um 2025, og leggur dent á, at tað er liðið, sum saman vinnur dystirnar og FM.

– Vit hava eina eind, sum arbeiðir fyri hvørjum øðrum. Har vit til dømis síggja, at tað eru ymiskir leikarar, ið vinna dystirnar fyri okkum. Í summum førum er tað álopið, sum fær sigrarnar heim og í summum førum verjan. Og so arbeiða allir sjálvandi beinhart fyri at bæði álop og verja rigga best møguligt. Allir viljað gjarna hava bóltin og vilja spæla flottan fótbólt, men samstundis eru vit ikki ov „fínir" til at taka arbeiðshandskarnir uppá, sigur ein væl nøgdur Arnbjørn at enda.

### STRÓR FRAMGONGD HJÁ KVINNUNUM

Eftir nøkur ár, har Víkingur hevur ligið aftanfyrihini toppliðini, so broyttist nakað í fjør. Lokalu landsliðsspælararnir, Jensa Kannuberg Tórolvsdóttir og Mona Rasmusdóttir, komu aftur til felagið, meðan liðið eisini fekk tilgongd av Leu Lisberg og málverjanum Eyðgerð Mikkelsen.

Tað gekk eisini væl hjá Víkingakvinnunum. Tær vóru fremst í grundspælinum og endaðu trý stig frá fyrstaplássinum í endaspælinum. Eisini komu tær í steypafinaluna, har tær tó taptu greitt fyri NSÍ.

Toppskjúttin við 22 málum, Jensa Tórolvsdóttir, er sum heild væl nøgd við farna kappingarár.

– Vit eru sera stoltar um ta stóru framgongd, vit vístu í fjør, í mun til undanfarin ár. Vit lógu væl fyri stóran part av kappingini, og fyri fyrstu ferð komu vit í steypafinaluna. Tá kappingin var at enda komin, vóru vit tó vónbrotin um, at vit ikki megnaðu at fáa gullið, tá vit vóru so nær við, sigur Jensa, sum kom aftur til Víking, eftir at hava roynt seg í donskum fótbólti.

> *„Vit hava so at siga sama hóp sum í fjør, so vit ætla at byggja upp á tað, sum vit arbeiddu við í 2024"*

Hóast hon er komin heimaftur, so hevur hon ikki heilt slept møguleikanum at fara aftur av landinum at spæla fótbólt. Í fyrsti atløgu er sjóneykan tó vend móti Víkingi í 2025, har tær helst vilja gera tað betri enn í fjør.

– Vit hava so at siga sama hóp sum í fjør, so vit ætla at byggja upp á tað, sum vit arbeiddu við í 2024. Lea Lisberg, sum var ein týðandi leikari í fjør, er langtíðarskadd, og verður ikki at síggja á vøllinum í ár, og tað er ein stórur missur. Vit ætla okkum at liggja í toppinum, og vónandi kunna vit geva NSÍ og KÍ harða kapping, sum bæði síggja sterk út aftur í ár, sigur ein vónrík Jensa Kannuberg Tórolvsdóttir at enda.





# MÁLIÐ ER AT NÁA ÚT Í EVROPA

*B36 hevði ikki eitt av sínum bestu árum í fjør, men sambært nýggja venjaranum, Jákupi Martin Joensen, so er málið tó tað sama í ár. – Kappingin er hørð um plássini, sum geva atgongd til evropiskan fótbólt, men vit trúgva uppá tað, sigur fryntligi og avgjørdi venjarin*

**BROYTINGARTÍÐIR Í B36**

– Vit eru farin undir eina langtíðarætlan og spæla nú eitt nýtt lið saman, sigur venjarin, sum fyrr hevur víst stórt dugnasemi, og fingið frálík úrslit.

Serliga var tað í barndómsfelagnum, EB/Streymi, at hann vísti síni evnir sum ein venjari, ið væl megnar at byggja ein sunnan hóp upp, nærum av nýggjum. Í so máta passa B36 og Jákup Martin væl saman, tá hugsað verður um verandi útgávu av árstalsfelagnum.



***Brian Jakobsen og Ragnar Samuelsen eru aftur í Gundadali***

**DÚVA MEIRA Á EGIÐ TILFEINGI**

B36 hevði fleiri útlendskir leikarar í hópinum farna kappingarár, men í ár verður nakað øðrvísi. Í høvuðsheitum er hópurin settur saman av egnum leikaratilfeingi, og harafturat hevur nýggi venjarin fingið lokkað leikarar við sær, sum hann hevur vant í Sundalagnum.

Talan er um góðar leikarar, ið hava drúgvar royndir í bestu deildini. Hesir koma heilt vist at geva ungu leikarunum góðan stuðul, og kunnu verða við til at geva hópinum eina sunna javnvág.

**„Vit skulu endurvinna eitt av evropaplássunum“**

Av teimum, sum eru lagdir afturat hópinum hjá B36 teljast royndir leikarar sum Heini Vatnsdal úr KÍ, Filip Djordjevic, Jóhann Hansson Joensen og Bergur Poulsen úr EB/Streymi, Ragnar Samuelsen og Brian Jakobsen úr B68, Bogi Reinert Petersen úr ÍF, Markus Hellisdal úr Skála og Baldur Niclasen úr HB.

Tilgongdin er sostatt stór, men tað hevur eisini verið nakað av frágongd samanborið við farna kappingarár. Fabian Ness, Jann Benjaminsen og Michal Przybylski eru farnir til NSÍ, og Andrass Johansen og Magnus Egilsson eru farnir uttanlands. Harafturat er tað bara Marius Kryger Lindh sum er eftir av útlendsku leikarunum frá í fjør.

Hópurin er tískil rættuliga nýggjur, og tað eru nógv viðurskifti sum skulu arbeiðast við, fyri at fáa samspælið at virka til fulnar. Men í Jákupi Martin Joensen hevur B36 kanska best egnaða venjaran til júst slíka uppgávu.



***Nýggi høvuðsvenjarin í B36, Jákup Martin Joensen***



*– Vit skulu gera tað betur enn í fjør, sigur Mattias Hellisdal*





*Valborg Østerø, B36-málverji*

### VÓNRÍKIR, HÓAST STÓRAR BROYTINGAR

Mattias Hellisdal er ein av ungu leikarunum, sum longu hava fingið fitt av royndum á besta liðnum, og hann fer ivaleyst at verða nógv at síggja aftur í ár. Ungi B36'arin er vónríkur um hvussu árið fer at hilnast, og hevur sett sær sum mál, at byggja uppá sítt spæl frá í fjør.

– Eg ætli mær at halda áfram við góðu gongdini frá í fjør, og so ætli eg mær eisini at vinna mær pláss á U21 landsliðnum, sigur miðvallarin við tí góða bóltførleikanum.

### SKULU Í FINALUNA AFTUR Í ÁR

– Vit skulu gera tað betur enn í fjør, og vit skulu í steypafinaluna aftur í ár. Eisini skulu vit endurvinna eitt av evropaplássunum á stigatalvuni, sigur Mattias, sum ásannar, at tað er ein spennandi uppgáva, nú tað eru so nógvar broytingar í hópinum.

Hann nevnir millum annað, at leikararnir skulu læra hvønn annan at kenna bæði á og uttanfyri vøllin, og at hann ivast ikki í at tað verður eitt gott kappingarár í 2025.

Venjarin, Jákup Martin Joensen rundar prátið av og sigur, at B36 fjepparin í ár kann vænta sær eitt hart arbeiðandi, orkuríkt og vælskipað lið, sum spælir álopskendan fótbólt.

### UNGIR OG EVNARÍKIR LEIKARAR SLEPPA FRAMAT

Nú útlendsku leikararnir mestsum allir eru farnir avstað aftur, so gevur tað møguleikar til teir ungu, og tá Mattias verður spurdur um hvønn hann heldur at vit eiga at hyggja væl eftir í ár, so nevnir hann ein miðvallara sum eitur Djóni Sivertsen, sum tykist serliga spennandi.

– Djóni ger tað rættuliga gott til venjingarnar, og eg síggi stórar menningarmøguleikar í hesum 17 ára gamla úrmælingi, sigur fryntligi miðvallarin, sum sjálvur einans er 18 ár. Framtíðin tykist bjørt, og tað er gleðiligt fyri føroyskan fótbólt.

**„Vit fegnast saman um sigrarnar, og standa saman, tá tað gongur minni væl“**

### KVINNURNAR BYGGJA UPP Á

Valborg Østerø, sum er málverji á besta kvinnuliðnum hjá B36, staðfestir, at kvinnuliðið hevur greiðar ætlanir um, at í ár skal man byggja víðari á úrslitið frá í fjør.

– Vit leggja allar nógv fyri til venjing, bæði í styrkirúminum og úti á vøllinum, sigur 22 ára gamli málverjin, sum eisini javnan er í landsliðshópinum.

Í fjør gjørdust B36 kvinnurnar ov stuttar til at spæla í ovara bólkinum og harvið at kappast um FM, men vunnu hinvegin niðara bólkin greitt.

### B36 ER MEIRA ENN BARA EITT FÓTBÓLTSLIÐ

– At spæla við B36 er serligt, tí felagið er meira enn bara eitt fótbóltslið – tað er sum ein familja. Tað er eitt stað har vit øll, bæði leikarar, venjarar og øll rundan um liðið, stuðla hvør øðrum, og gera okkara besta fyri at lyfta felagið framá, sigur ungi, men royndi málverjin, og leggur dent á, at tað eru øll smílini, bæði í góðum og truplum løtum, sum gera munin.

– Vit fegnast saman um sigrarnar, og standa saman, tá tað gongur minni væl, sigur Valborg Østerø, sum í ár spælir sítt fimta kappingar fyri B36.

### NÓGVAR UNGAR SLEPPA FRAMAT

– Tað er stuttligt at síggja at hópurin veksur, og at tað legst tafturat við ungum leikarum, sigur Valborg, og við einum ávísum stoltleika greiðir hon frá, at onkrar av teimum ungu hevur hon sjálv vant í ungdómsdeildunum.





# "Skeiva langa tá…"

*Tað er eitt av fleiri rópum, sum stundum eru at hoyra kring vøllirnar í Føroyum. Fjepparamentanin er við til at seta kulør á fótbóltsupplivingina*



Finnur Joen-Jacobsen, 07 Vestur-fjeppari



Heri Wang Danielsen, B68-fjeppari

**Hvat er fótbóltur uttan áskoðarar?** Tað fingu vit svar upp á undir koronafarsóttini. Fótbóltur uttan áskoðarar er bara ein upphevjað venjing. Tað kann als ikki samanberast. Tað finnast eisini nógv sløg av áskoðarum. Tað fingu vit sjón fyri søgn, tá Hadjuk Splidt var á vitjan í fjørsummar.

Her í Føroyum hava vit eina søgu við fjepparafeløgum, sum á ymiskan hátt hava sett sín dám á føroysku kappingina, og ikki minst á Tórsvølli, tá landsliðið spælir.

Tey flestu munnu kenna okkurt av fjepparafeløgunum í Føroyum. 12. maður var heitið á fjepparafelagnum hjá landsliðnum. Síðani er nýtt fjepparafelag stóvnað og tað er Skansin. Úti í feløgunum eru eisini fleiri fjepparafeløg, sum skiftivís hava gjørt nógv burturúr.

White Tigers hjá B36, Ultras hjá Víkingi, Guliganz hjá NSÍ, Einherjar hjá TB og Bláa Bylgjan hjá KÍ eru nøkur teirra.

Fjepparamentanin kring eitt felag kann hava fleiri upprunar. Tað kann verða søguligur siður, at felagið hevur góðar áskoðarar. Tað kann eisini verða góðan gongdin ella rætta samansetingin av í flestu førum ungum fólki, ið tíma væl at skapa ein góðan stemning til dystir.

> **„Tú stendur og rópar og geylar eftir tínum gomlu floksfeløgum"**

Eitt skifti í fyrsta áratíggjunum í hesi øldini varð skipað fyri fjepparakapping og heiðran av bestu fjepparunum. Millum annað sóu Frensarnir á Argjum dagsins ljós, tá AB á fyrsta sinni flutti upp í bestu deildina.

Eitt annað skeringspunkt var steypafinalan í 2016, tá KÍ og Víkingur megnaðu at fylla Tórsvøll. Hetta setti ein nýggjan yvirleggjara fyri hvat ber til.

## VESTURSÍÐAN OG REYÐI PANTARIN ERU TIL REIÐAR

Í 2020 fluttu bæði 07 Vestur og B68 upp aftur í bestu deildina – og har eru tey enn. Bæði feløgini hava útmerkað seg við góðum og stuttligum fjepparum, ið seta sín dám á. Eisini tá tað gongur illa og veðrið ikki er av tí besta.

Fjepparafelagið hjá 07 Vestur eitur „Vestursíðan". Tað byrjaði við, at Ragnar í Haraldsstovu, núverðandi formaður í Vestursíðuni, einsamallur byrjaði at spæla trummur og rópa. Síðani løgdust fleiri afturat. Ein teirra var Finnur Joen-Jacobsen, sum eisini stendur fyri tónleikinum og er stadiumspeakari á Dungasandi. Gjøgnumbrotið var í 2023, tá 07 Vestur megnaði at savna fleiri hundrað fjeppparar til seinnu hálvfinaluna í steypakappingini móti KÍ í Klaksvík.

– Tað var ein øgiliga stór løta, sjálvt um vit taptu. Tá byrjaðu vit at trúgva upp á, at hetta við fjepping eisini kann bera til her. So settu vit formelt Vestursíðuna á stovn, sigur Finnur Joen-Jacobsen, ið heldur at føroyingar kunnu verða nakað afturhaldandi.

– Fjepparamentanin í landinum er ikki tann, hon burdi verið. Sigast skal at glottar hava verið hjá okkum, B68 og KÍ. Tað sær út til at onnur eisini eru byrjaði at vakna, sigur Finnur Joen-Jacobsen.

Fjepparafelagið „Vestursíðan" verður aftir at síggja og hoyra komandi kappingarár. Arbeitt verður við nýggjum sangum og vónin er, at fleiri fjepparar leggjast afturat.

## „HETTA ER EITT SINDUR ABSURT"

– At vera fjeppari í Føroyum er stuttligt, tí tað er eitt sindur absurt. Tú stendur og rópar og geylar eftir tínum gomlu floksfeløgum, vinum, familju og inn í millum onkrum útlendingi, sigur Heri Wang Danielsen.

Fyri fýra árum síðani fór Heri, saman við beiggja sínum Svend, undir at savna nakrar fjepparar hjá B68. Burturúr hesum kom rópkórið hjá „Reyða Pantaranum". Teir umskrivaðu nøkur av kendu altjóða rópunum og slagorðunum, so tey passaðu til spælararnar hjá B68. Nú síggjast teir standa við vøllin og rópa og syngja, hóast tað ikki altíð er so hugaligt hvat veðrið og gongdini hjá B68 viðvíkur.

– Tað má vera eitt sindur sjálvironi uppií. Fjepparamentanin er fátøk, á tann hátt, at fótbóltur í Føroyum kann tykjast at vera nakað vit dáma at hyggja eftir og tosað um. Í ørðum londum ræður tað næstan um lív ella deyða. So kontrastin er stór, men tað er stuttligt at skrála lívið úr sær til ein dyst við undir hundrað áskoðarum. Tað kann eisini okkurt, sigur Heri Wang Danielsen.

Reyði Pantarin hevur tó fingið ein avbjóðing til komandi kappingarár, sum Heri ikki er so keddur av.

– Tað er avmarkað hvussu nógv vit kunnu verða, og afturat tí eru fleiri av okkara ungu fjepparum, sum hava stuðlað og rópt seinnu árini, sjálvir byrjaðir at spæla á besta liðnum, men tað er nakað av tí besta. At tað er skjótt frá at vera fjeppari til spælari hjá B68, sigur Heri Wang Danielsen.

At enda hevur hann eina viðmerking um komandi kappingarár – og hon lýsir væl fjepparamentanina í Føroyum.

– NSÍ hevur ongantíð vunnið á okkum uttanfyri vøllin, og tað fara teir heldur ikki í ár, sigur Heri Wang Danielsen sannførandi!

Spennandi verður at fylgja fjepparafeløgunum og fjepparunum, nú enn eitt fótbóltsár stendur fyri framman. Teirra partur liggur ikki eftir, og tað hava teir stórt rós uppiborið fyri.

# VÓNANDI KOPPAR OKKARA VEG Í ÁR

*B71 hevur seinastu fýra árini verið tætt við at vinna sær uppflyting til Betrideildina, og sambært Boga Hentze, ið er leikari og nevndarlimur í B71, so vóna tey, at tað fer at koppa teirra veg í ár*

**– Vit hava ligið í oddinum** á 1. deild seinastu árini, og nógv av hesum árum hevur tað víst seg at verið tann allarsíðsti dysturin sum hevur verið avgerandi, sigur Bogi, ið veruliga vónar, at tað nú fer at koppa teirra veg.

> **„At blíva nevndarlimur haldi eg er ein spennandi uppgáva. Tað er nakað eg ikki havi roynt áður, men eg haldi at tað er rættuliga gevandi“**

## SPENNANDI VIÐ FLEIRI HATTUM Á

– Nú havi eg spælt við besta liðnum í fleiri ár eftir hondini, og at blíva nevndarlimur haldi eg er ein spennandi uppgáva. Tað er nakað eg ikki havi roynt áður, men eg haldi at tað er rættuliga gevandi. Eisini haldi eg, at man fær betri innlit í, akkurát hvussu nógv skal til, fyri at dríva eitt fótbóltsfelag, sigur leikandi nevndarlimurin í B71.

## TUNNILIN GEVUR OKKUM BETUR SØMDIR

Sambært Boga Hentze eru tað í ár lagstir fleiri leikarar afturat hópinum, sum annars ikki hava tilknýti til oynna, og hetta letur seg gera, tí fast samband nú er við meginøkið gjøgnum nýggja undirsjóvartunnilin. Hann leggur afturat, at tað eisini tekur munandi styttri tíð at ferðast á dystardøgunum, umframt at ferðast til og frá venjing.



*Bogi Hentze, spælandi nevndarlimur*



*– Vit hava eitt ungt lið, fult av dugnaligum leikarum, sum hava fingið blóð á tonnina, sigur Suni Herman Petersen*

## SKÁLAVÍKINGURIN ER VENDUR HEIM AFTUR

Suni Herman Petersen sum í fjør royndi seg í Sundalagnum við EB/Streymi er nú aftur í B71, har tað heila byrjaði hjá honum. Hann er blivin 19 ár, og verður 20 í mai mánað, men hann hevur longu fingið hópin av virðismiklum royndum.

Suni Herman hevur umboðað U17 og U19 landsliðini, og var við í 21 av 27 dystum hjá EB/Streymi í bestu deildini í fjør. Sostatt er tað ein spennandi styrkur sum B71 fær í ár, og hansara mál er greitt: B71 skal upp í bestu deildina í ár.

– Kenslan er góð, og eg eri sera spentur uppá komanadi ár við barndómsfelagnum, sigur Suni Herman Petersen.

> ***„Eg eri sera spentur uppá komandi ár við barndómsfelagnum"***

### UNGT OG SPENNANDI LIÐ

Bogi og Suni Herman eru á einum máli um, at tað sær spennandi út hjá sandoyingum í ár. Hópurin er ungur og góður, teir venja nógv og hart, og hýrurin er eisini góður í felagnum. Sambært Suna Herman, so metir hann, at B71 hevur góðan møguleika at flyta upp.

– Vit hava eitt ungt lið, fult av dugnaligum leikarum, sum hava fingið blóð á tonnina, eftir at uppflytingin var so nær við í fjør. Og vit ætla okkum sjálvandi at geva alt, ið krevst, fyri at tað skal eydnast hesaferð, sigur ungi profilurin úr Skálavík.

Sandoyingarnir byrja landskappingina á útivølli móti KÍ leygardagin 8. mars.



MOWI



FAROE ISLANDS

RINKA

· FINEST SALMON ·

CRAFTED BY NATURE

Allur heimurin veit tað. Og vit í Føroyum vita tað.
Laksur úr Føroyum er heimsins besti.

Rinka. Laksur úr Føroyum frá Mowi.

RINKA.FO

# AFTUR VERJA BORG Í HÓLMANUM

*Eftir eitt ár við Margáir skal EB/Streymur aftur til Eiðis at spæla sínar heimadystir. Seinastu árini hevur felagið spælt annaðhvørt ár við Margáir og í Hólmanum á Eiði. Ungi vinstri bakkurin, Virgar Jónsson, gleðir seg at spæla heimadystir í heimbygdini*

– **Mær dámar best** at spæla heimadystirnar í Hólmanum, sigur 18 ára gamli eiðismaðurin, sum hóast sín unga aldur longu hevur spælt nærum 50 dystir fyri besta liðið hjá sundalagsmonnum.

– Tað er altíð deiligt at spæla í heimbygdini. Vøllurin liggur sum ein savnandi miðdepil mitt í bygdini og er samstundis heimsins besta spælipláss. Men eg haldi at vit í felagnum hava uppbygt eina góða siðvenju, har vit skifta í millum Hólman og Margáir. Hetta ger, at vit kenna okkum heima í báðum støðum.

## NØGDIR, MEN KANN GERAST BETRI

EB/Streymur var leingi partur av niðurflytingarstríðnum í fjør, men ein frálíkur endaspurtur gjørdi, at plássið í deildini ongantíð kom í veruligan vanda.

**„Vøllurin liggur sum ein savnandi miðdepil mitt í bygdini og er heimsins besta spælipláss“**

– Vit eru „OK“ nøgdir við kappingarárið í fjør. Aðalmálið var at varðveita plássið í deildini og harafturat at menna egi tilfeingi. Tað tók sína tíð at tryggja plássið – men tað gekk. Vit vóru eisini nakrir ungir, sum fingu væl av spælitíð, og mentust tilsvarandi, greiðir Virgar frá.

Fleiri av føstu monnunum frá kappingarárinum 2024 eru farnir til onnur feløg – millum annað Bergur Poulsen, Jóhann Hansson Joensen og Filip Djordjevic, sum allir hava skrivað undir við B36. Men hóast eina ávísa frágongd, so er Virgar bjartskygdur um komandi kappingarár.





*Í Hólmanum á Eiði*





– Tað verður nokk saknur í onkrum av spælarunum, sum eru farnir; men eg meti tó, at teir sum eru komnir inn í teirra stað síggja spennandi út, og vónandi kemur onkur styrkur afturat. Fáa vit onkran styrk afturat, so haldi eg vit kunnu halda sama stig – og møguliga hækka tað, sigur ungi eiðismaðurin, og vónar at teir klára at klatra eitt sindur longur upp á stigatalvuni.

### DROYMIR STÓRT, MEN HEVUR BÆÐI BEININI Á JØRÐINI

Seinastu tvey árini hevur ungi bakkurin veruliga víst sínar dygdir á fótbóltsvøllinum. Men hóast tað hevur verið áhugi fyri honum aðrastaðni, valdi hann at skriva undir nýggjan sáttmála við barndómsfelagið.

> ***„Ein fótbóltsuppliving uttanlands er áhugaverd og lokkandi. Og eitt pláss á U21 landsliðnum er sjálvandi eisini eitt mál, sum eg havi sett mær“***

– Í løtuni hugsi eg um mína egnu fótbóltsmenning, og tá er EB/Streymur eitt gott val. At fáa minuttir í bestu deildini í Føroyum, er avgjørt mennandi – og so harafturat at hava ein venjara, sum hevur dirvi og mót at brúka ungar spælarar – eisini tá tað stendur á – er sera mennandi fyri meg.

Hóast Virgar Jónsson trívist væl í EB/Streymi og gleðir seg til heimadystirnar í Hólmanum á Eiði, so hevur hann eisini dreymar um at royna seg uttanlands.

– Ein fótbóltsuppliving uttanlands er áhugaverd og lokkandi. Men fyrst og fremst vil eg mennast og verða skaðafríur, og so skulu tølini helst batna – øll hesi hagtølini, ið vit verða máldir uppá. Og eitt pláss á U21 landsliðnum er sjálvandi eisini eitt mál, sum eg havi sett mær fyri at náa.





Vit ynskja EB/Streymi
eitt gott kappingarár

SUNDA KOMMUNA

sunda.fo

# STRÍÐ UTTAN BOTNSTRÍÐ Á SVANGASKARÐI

*Jákup á Borg er framvegis á brúnni, meðan 19 ára gamli miðvallarin, Hanus Højgaard, tekur enn eitt tørn á dekkinum á Svangaskarði, har B68 helst vil sleppa undan nýggjum botnstríði*

**Fá mundu geva B68 stórvegis** møguleikar at bjarga sær plássið í Betri-deildini, tá toftamenn vitjaðu við Løkin í síðsta umfari í fjør. Ein sigur – hvørki meir ella minni – var kravið í grannauppgerðini ímóti NSÍ, sum neyvan hevði nógv ímóti at senda B68 niður. Uttanfyri girðingina stóð ein ikki sørt sperdur Hanus Højgaard við leikbanni.

– Tað stóð gott nokk nógv á hjá mær allan dystin, sigur Hanus Højgaard, sum hevði fingið fitt av leiktíð alt kappingarárið, hóast hann bert var 18 ára gamal.

Hann kundi bert hyggja at saman við familju, vinum og viðhaldsfólki annars, tá B68 við Jóhan Josephsen og einum stórspælandi Bartali Páll Klein á odda vann heili 4-1 og tryggjaði sær minst eitt ár afturat á ovastu rók.

**„Spælarar, nevnd og viðhaldsfólk eru sjálvsagt glað fyri, at Jákup heldur fram“**

– Tað var ein øgiligur liðinnsatsur, og eg kann líka heilsa og siga, at málið til 3-1 var ein sera stór og rørandi løta, og eyguni vóru full av tárum, sigur arbeiðssami miðvallarin av Nesi.

## JÁKUP FRAMVEGIS Á BRÚNNIÐ

Hesa góðveðurslǿtuna í Runavík rakti eitt heldur ilsligt kappingarár hámarkið. Á vøllinum hevði B68 meir enn trupult við at skjóta mál, og uttanfyri linjurnar valdaði óróð eisini. Jákup á Borg tóktiskt takka fyri seg, men tá bylgjurnar høvdu lagt seg, so samdist hann kortini við nýggju nevndina um framhald.

– Spælarar, nevnd og viðhaldsfólk eru sjálvsagt glað fyri, at Jákup heldur fram. Hann er ein fantastiskur venjari og menniskja, og vit eru øll sera góð við hann, slær Hanus Højgaard fast.

– Hann hevur prógvað ferð eftir ferð, at hann er ein klassavenjari.




*– Míni mál fyri árið eru at menna meg mest møguligt og at fáa fast pláss á liðnum, sigur Hanus Højgaard*



*Hanus Højgaard, B68*

Hetta prógvaði hann kanska serliga, tá ið hann leiddi okkum allan vegin til finaluna um Løgmanssteypið, sum er nógv tann størsta fótbóltsupplivingin, sum felagið hevur havt í nógv ár, sigur Hanus Højgaard.

## NÓGVIR ÚT – NÓGVIR INN

Hanus Højgaard er nú eitt ár eldri, og helst skal hann taka minst líka nógva ábyrgd hetta kappingarárið.

– Míni mál fyri árið eru at menna meg mest møguligt og at fáa fast pláss á liðnum. Kappingin um plássini er tó hørð og sunn, so tað kemur tú ikki sovandi til, sigur Hanus Højgaard.

– Eg eri altíð klárur at spæla har, sum Jákup velur at seta meg. Eg spæli við hjartanum uttanfyri troyggjuna, og taki liðið framum meg sjálvan.

Ragnar Samuelsen, Bartal Páll Klein, Brian Jakobsen og aðrir eru farnir aftur til høvuðsstaðin, men tað nítur B68 ivaleyst fastast, at sterki U21-landsliðsverjuspælarin Áki Johannesen tók av tilboði úr HB.

Hinvegin eru millum annað Magnus Holm Jacobsen, Martin Klein Joensen og Jákup Vilhelmsen komnir afturat hjá Jákupi á Borg á Svangaskarði.

***„Tað er í dystum, at eg skal prógva, at eg havi neyðuga stigið til at spæla við landsliðnum“***

Hanus Højgaard vil illa siga nakað um málið hjá besta B68-liðnum í ár – hann heldur ikki, at tað er hansara uppgáva.

– Men eg kann í øllum førum siga, at vit í B68 fegnir vilja klára okkum betur enn síðsta ár, og royna at skræða okkum búrturúr einum botnstríðið.

Tann royndin byrjar ikki júst við léttasta dystinum. B68 skal nevniliga sparka nýggja kappingarárið í gongd í fríggjadagsdysti ímóti HB í Havn.

– HB hevur altíð góðan hóp, men tað haldi eg eisini, at vit hava, so málið er sjálvsagt at kunna stjala eitt ella øll trý í Gundadali. Eingin fer til dyst fyri at tapa, og um vit ikki trúgva upp á tað, hvør skal so, spyr evnaríki miðvallarin.

## U21-LANDSLIÐIÐ LOKKAR

Hanus Højgaard viðgongur, at hann hevur gott eyga á einum plássi á føroyska U21-landsliðnum, sum hevur staðið seg væl síðstu árini, men hann er greiður yvir, hvar grundarlagið skal leggjast.

– Tað er í dystum, at eg skal prógva, at eg havi neyðuga stigið til at spæla við landsliðnum, og tí er mítt fokus fyrst og fremst at standa meg væl í føroysku kappingini, sigur Hanus Højgaard.

Júst tann uppgávan byrjar í Gundadali 7. mars.





NES KOMMUNA
Ein kommuna fyri øll
TRIVNAÐUR
ÁBYRGD OG ÁLIT
MENNING

# Nýggj kapping við nýggjum venjara

*Eftir hálvannað ár undir Signe Pries Andersen, skal A-landsliðið við kvinnum hava nýggjan venjara. Dámligi danski venjarin ynskti at flyta aftur til Danmarkar við familjuni – samstundis sum hon tók av starvi í danska fótbóltssambandinum*


*Jakobu Langgaard, hjálparvenjari og Pætur Smith Clementsen, fyribilsvenjari*

**Veruleikin hjá føroyska** kvinnulandsliðnum er tí, at nýggjur venjari skal finnast samstundis sum ein nýggj UEFA Nations League kapping stendur fyri framman. Fyribils hevur FSF sett Pætur Smith Clementsen í starvið – hetta fram til í summar, tá nýggjur venjari helst verður settur.

– Eg havi verið venjari hjá U19 gentunum, og hava tískil fylgt væl við í tí, sum hendir í Betrideildini hjá kvinnum. So eg kenni allar spælararnar sera væl. Av tí at skotbráið, at fara undir eina nýggja tilgongd at seta venjara og samstundis sum fyrstu dystirnir vóru longu í februar, var stutt, bleiv mett at hetta var besta loysnin, sigur fyribils landsliðsvenjarin.

## HARMAST UM ENDAN VIÐ SIGNE

Pætur Smith Clementsen er eisini tekniskur stjóri í Fótbóltssambandi Føroya, og tað er eisini hann, sum hevur landsliðsvenjararnar undir hond. Hann harmast tí um, at samstarvið við Signe endaði longu eftir hálvtannað ár.

– Úrslitini og dystirnir í seinastu undankapping góvu eina ábending um, at viðurskiftini gingu rættan veg.

> **„Høvdið á spælarunum er púra frískt mentalt og spælararnir eru svangir eftir at fáa stig“**

Vit høvdu nakrar góðar dystir – millum annað Kýpros á heimavølli, har vit høvdu nógvar málmøguleikar, men har tað bara ikki koppaði okkara veg, sigur Pætur, sum leggur afturat, at tað sjálvandi er torført at eftirmeta tíðina hjá Signe, tí tíðarskeiðið hjá henni var so stutt.

## HJÁLPARVENJARI FULLA TÍÐ

FSF hevur seinastu árini uppraðfest A-landsliðið við kvinnum. Hetta hevur millum annað verið gjørt við at seta útlendskar venjarar fullatíð. Men bæði Lene Terp og Signe Pries Andersen eru givnar í starvinum fyrr enn ætlað.

Hetta skapar sjálvandi nakað av órógv og ójavnvág rundanum landsliðið, staðfestir tekniski stjórin, men sigur, at tey nú hava funnið eina skilagóða loysn fyri at tryggja støðufesti.

– Vit hava sett Jakobu Langgaard í fulltíðarstarv sum hjálparvenjara. Hetta er vónandi ein stabilari loysn, sum eisini tryggjar at toymið kring landsliðið er tað sama, hóast navnið á høvuðsvenjaranum broytist, sigur Pætur Clementsen, og sigur, at tilgongdin at finna nýggjan venjara byrjar seinni í vár, og vónin er, at nýggjur venjari verður settur innan alt ov langa tíð.

## NATIONS LEAGUE Í FEBRUAR

Tá hendan greinin verður skrivað, eru fyrstu dystirnir í UEFA Nations League kappingini ikki spældir. Seks dystir eru annars á skránni í ár, sum allir verða spældir áðrenn summarsteðgin.

Hini londini í bólkinum eru Gibraltar, Moldova og Slovakia. Tveir teir fyrstu dystirnir eru móti Gibraltar og Slovakia. Hesir dystirnir vórðu spældir longu í februar – áðrenn føroyska kappingin er byrjað.

– Tað er sjálvandi ein avbjóðing, at fyrstu landsdystirnir verða spældir áðrenn heimliga kappingin er farin í gongd, tí spælararnir eru ikki í dystarvenjing, og vit hava tí heldur ikki havt serliga góðar møguleikar at síggja spælararnar, sigur Pætur, sum eisini leggur dent á, at hetta ikki skal verða nøkur undanførsla, og at landsdystir í februar hinvegin kunnu gerast ein motivatión til spælararnar at verða í góðum formi longu nú.





Mótstøðan í UEFA Nations League er ymisk. Slovakia er sterkasta landið í bólkinum, meðan Gibraltar er liðið, sum Føroyar helst skulu hava stig ímóti.

– Eg vóni at vit klára at fáa stig og kanska vinna á Gibraltar, meðan Moldova er eitt lið, har tað helst verður nøkulunda javnt.Hinvegin er eingin ivi um, at Slovakia er sterkasta landið í bólkinum. Hetta verður ein spennandi avbjóðing, men hóast spælararnir ikki eru í dystarvenjing, so er høvdið á spælaraunum púra frískt mentalt og spælarnir eru svangir eftir at fáa stig, sigur Pætur Smith Clementsen at enda.

Fyrsti heimadysturin hjá føroyska kvinnulandsliðnum verður fríggjadagin 4. apríl, tá Moldova kemur á vitjan.

### Leikskráin

| | |
|---|---|
| 21. februar | **Slovakia – FØROYAR** |
| 25. februar | **Gibraltar – FØROYAR** |
| 4. apríl | **FØROYAR – Moldova** |
| 8. apríl | **FØROYAR – Gibraltar** |
| 30. mai | **Moldova – FØROYAR** |
| 3. juni | **FØROYAR – Slovakia** |

# BARA UNGDÓMS-LIÐ Í ÁR

*Fótbóltsfelagið Royn í Hvalba er helst minsta fótbóltsfelagið í landinum, men virksemið í felagnum blómar, tí óvanliga nógv børn í Hvalba eru virkin í Royn*

**Fyri fyrstu ferð í fleiri ár** hevur Royn einki lið í vaksnamannadeildunum. Formaðurin í felagnum, Eyðstein Jacobsen, greiðir frá, at orsøkin er, at tað er so tungt at manna lið.

– Vit hava havt lið í 2. deild hjá monnum, men tað hevur fyrst og fremst verið fólk, sum býr norðanfyri, ið hava mannað liðið, men vit klára tíverri ikki at manna liðið í ár. Tað er ov tungt, og eg dugi ikki at síggja fyri mær, at vit hava nakað vaksnamannalið í nærmastu framtíð, sigur Eyðstein Jacobsen.

## ONGI FELAGSLIÐ

Í fleiri umførum hevur Royn havt samstarv við hini bæði feløgini í Suðuroynni, TB og FC Suðuroy, um felagslið. Men í ár verður einki samstarv við tvøramenn ella vágbingar.

> **„Vit klára tíverri ikki at manna liðið í ár. Tað er ov tungt“**

– Í ár hava vit bara egin lið, og tað er bara talan um ungdómslið. Men vit hava lið líka úr U7 upp til U15 hjá dreingjum og U16 hjá gentum. Men tey elstu gentu- og dreingjaliðini spæla tó á hálvum vølli, tí annars hava vit ikki nokk av leikarum, sigur formaðurin.

Hann dylur tó ikki fyri, at tey í Hvalba kundu gott ynskt sær, at tað var møguleiki við felagsliðum, men soleiðis verður tíverri ikki í ár.

## STÓR TILGONGD

Tað má tó sigast at vera flott av eini so lítlari bygd sum Hvalba at megna at hava lið í so mongum av ungdómsdeildunum, og Eyðstein Jacobsen ásannar eisini, at felagsskapurin Royn hevur tað gott.




*– Eg dugi ikki at síggja fyri mær, at vit hava nakað vaksnamannalið í nærmastu framtíð, sigur Eyðstein Jacobsen, formaður í Royn*


Hvalba

– Tilgongdin hevur verið øgiliga góð. Fara vit eini seks-sjey ár aftur í tíðina, so vóru tað øgiliga fá børn í Hvalba, sum vóru aktiv í Royn ella í nakrari ítróttargrein yvirhøvur. Tað hava vit arbeitt miðvíst við at broyta, og í dag eru tað eini 70 prosent av børnunum í bygdini, sum eru aktiv í felagnum, og tað fegnast vit um, sigur formaðurin í Royn, og leggur afturat, at nógv verður gjørt fyri felagsskapin Royn.

– Tað, sum riggar hjá okkum her í Hvalba, er at hava tey í einum góðum felagsskapi, og tí gera vit nógv fyri tann partin. Felagið verður eisini øgiliga væl stuðlað av tí lokala samfelagnum og bygdarfólkinum. Øll hjálpa til og stuðla, og tað er alneyðugt, tí vit hava ongar stórar sponsorar, sum spýta nógvar pengar í felagið, sigur Eyðstein Jacobsen.

### SKULU HAVA NÝGGJAN HØVUÐSUNGDÓMSVENJARA

Ein av uppgávunum, sum stendur beint fyri framman hjá Royn, er at felagið skal finna nýggjan høvuðsungdómsvenjara.

***„Felagið verður væl stuðlað av tí lokala samfelagnum. Øll hjálpa til og stuðla, og tað er alneyðugt, tí vit hava ongar stórar sponsorar, sum spýta nógvar pengar í felagið“***

– Vit hava havt okkara egna, unga Brynjar Poulsen sum høvuðsungdómsvenjara, og tað riggaði væl, men hann er farin í skúla norðanfyri, og vit leita tí eftir einum nýggjum, sigur Eyðstein Jacobsen.

Ein av høvuðsuppgávunum hjá nýggja høvuðsungdómsvenjaranum verður at fáa gongd á samstarvið við bæði skúlan og barnagarðin í Hvalba aftur, tí tað riggaði avbera væl.

– Tað hevur gjørt, at børnini longu á heilt ungum árum hava kent seg trygg við at koma til fótbólt í Royn, sigur Eyðstein Jacobsen, og skoytir upp í, at tað somuleiðis hevur nógv at siga at felagið hevur ein góðan vøll, sum hevur tað gott, og at tey eisini hava góðar umstøður í Royn-høllini.

– Høllin er eisini opin fyri ungdóminum allan dagin at brúka, og tað gera tey, sigur formaðurin í Royn at enda.






# LÆTT OG TRYGT VIÐ JARÐHITA FRÁ EFFO

– Tá ið vit sóu, at Effo bjóðaði jarðhita, valdu vit at skifta oljufýrið út. Skiftið var sera ómakaleyst, tí Effo bæði boraði jarðhitan og setti skipanina upp. Síðani komu vit í teirra Hitatænastu, sum ger alt viðlíkahald, sum krevst. Og so er tað so deiliga tryggjandi at vita, at vit kunnu ringja allar dagar í árinum, um okkurt er.

*Tove Kruse Samuelsen*

effo

Les meira og fá tilboð upp á jarðhita og hitapumpu á effo.fo

# Met nógv landsliðs-virksemi

*Tað verða um 75 landsdystir við øllum í hesum kappingarárinum, umframt at EM-endaspælið fyri U17-landslið hjá gentum verður í Føroyum. Sum nakað nýtt verður nú eisini arbeitt við einum samstarvi við íslendska fótbóltssambandið, KSI*



*U17 og U16 gentulandsliðini vóru á venjingarlegu í Íslandi*

**Tað stendur eitt** spennandi og avbjóðandi kappingarár fyri framman hjá føroyskum landsliðsfótbólti. Við øllum íroknað – eisini A-landsliðunum – verður talan um einar 75 landsdystir í 2025.

Største avbjóðingin verður EM-endaspælið hjá U17-gentum, sum verður í Føroyum frá 4. til 17. mai. Tá koma tey bestu av teimum bestu í Evropa, at spæla á Tórsvølli og á Djúpumýru í Klaksvík, og er hetta samstundis fyrstu ferð, at Føroyar og Fótbóltssamband Føroya eru vertir fyri eini so stórari kapping hjá UEFA.

Í yngru deildunum verður arbeitt við at fáa fleiri tilboð til elituspælararnar. Ein liður í hesum er eitt møguligt samstarv við íslendska fótbóltssambandið, KSI og at skipa virksemið øðrvísi.

– Vit síggja í londum, sum eru á okkara støðd, at fótbóltssambondini spæla ein størri leiklut. Tað hyggja vit upp á, sigur Pætur Smith Clementsen, tekniskur stjóri í FSF.

## ÚRVALSVENJINGAR OG ÍSLANDSTÚRAR

Tað er hørð kapping í landsliðsfótbólti, og londini rundan um okkum gerast alsamt betri. Tað merkist, tá ungir føroyskir spælarar spæla ungdómslandsdystir.

> **„Vit uppliva at tað er stemningur fyri, at vit seta meira inn í elituvenjingini“**

– Í Luksemborg venja ungdómslandsliðini saman fýra ferðir um vikuna og spæla ein dyst. Hetta er frá U12 til U19. Tað er tað vit eru upp í móti, sigur Pætur Clementsen.

Í teimum stóru londunum eru akademi, har spælarar búgva og venja. Hetta hevur ikki verið upp á tal í Føroyum, men tekniski stjóri í Fótbóltssambandinum hevur hugt eftir londum, sum líkjast meira Føroyum í støðd og umstøðum.

– Vit hyggja eftir teimum og hvussu tey gera, og skulu so finna ein leist, sum riggar fyri okkum, sigur tekniski stjórin, og leggur afturat, at arbeitt verður við at gera eitt samstarv við íslandska fótbóltssambandið, um at spæla fleiri innanhýsis ungdómslandsdystir. Í Íslandi eru fleiri fótbóltshøllir og skalt tú av landinum, so er Ísland nærmast okkum og líkist í ítróttarligari styrkju.

– Tað gevur meining fyri okkum upp á fleiri mátar. Tað er stutt at ferðast og vit tillaga mótstøðuna eitt sindur, so fáa bæði liðini nógv burturúr, sigur Pætur Clementsen.

Í U15 eru tveir hópar við tilsamans 50 spælarum, ið venja úrvalsvenjing eina ferð um vikuna, og í U16 er talan um ein hóp við 28 spælarum, sum venur saman. Ein møguleiki, sum FSF hyggjur upp á, er at hesi venja tvær ferðir um vikuna í ávísum tíðarskeiðum, tá venjingini í feløgunum liggur still.

– Vit uppliva at tað er stemningur fyri, at vit seta meira inn í elituvenjingini, sigur Pætur Clementsen, og vísur á, at Fótbóltssambandið hevur sett fólk í fulla tíð hjá U16 og U17-landsliðunum hjá bæði gentum og dreingjum.

Tað verður eisini arbeitt við at gera úrvalsvenjing fyri aldursbólk U14, sum er árgangurin áðrenn spælarar á fyrsta sinni skulu royna seg í ungdómslandsliðshøpi.

– Her er tankin, at velja einar 80 spælarar, sum síðani venja í fleiri hópum king landið. Tað verður gjørt fyri at fáa fleiri spælarar við, sigur tekniski stjórin.

Málið er eisini at geva íblástur til venjararnar úti í feløgunum, sum hesir síðani kunnu taka við til venjingarnar í egnum felag.

## EM ENDASPÆL Í FØROYUM Í MAI

Størstu uppgávuna, sum er á skránni í ár, fáa U17 genturnar í 2008 árganginum, tá EM-endaspælið fyri U17-landslið verður í Føroyum frá 4. til 17. mai.

Hetta eru tær bestu av teimum bestu í Evropa, sum skulu avgera hvar EM-steypið skal enda, og sum vertir vera Føroyar partur av kappingini.

Sum liður í upphitingini til sjálvt endaspælið, verður føroyska U17-landsliðið við gentum við til EM-undankappingin fyri B-bólkin, ið annars er fyri lond, sum ikki eru við í sjálvum EM-endaspælinum. Her hava Føroyar fingið loyvi at luttaka, hóast Føroyar eru við til EM-endaspælið sum vertur.

Eftir EM-endaspælið skal 2009 árgangurin spæla dystir í summar og til EM-undankapping í heyst.

Fyri tey yngstu landsliðini, sum er U15, er talan um tvær uppgávur í 2025. Hjá dreingjunum verður ein venjingarkapping í heyst, og málið er eisini at fáar nakrar venjingarlandsdystir í desembur mánað. Hjá gentunum verður tað Baltic Cup og vónandi fáa tær eisini nakrar venjingarlandsdystir í desembur.

Fyri U17 dreingirnir er ongin NM-kapping longur. Tað hevur verið ein góð kapping fyri ungar føroyskar spælarar, men tað er ein dýr kapping, tí hon liggur um summarið, og tað hava verið ósemjur í onkrum av hinum londunum um ítróttarliga virðið í kappingini.

U19-liðini skulu bæði spæla í EM-undankapping og fáa eisini aðrar avbjóðingar, meðan U21-landsliðið skal spæla EM-undankapping sum vanligt.

Við øllum verða tað eini 75 landsdystir í hesum kappingarárinum. Tað er í miðal meira enn ein dystur um vikuna.

# HB ÆTLAR SÆR ALTÍÐ FØROYA-MEISTARA-HEITIÐ

*Tað er líka mikið um tað eru kvinnur ella menn, børn ella ung – í HB verður altíð farið eftir gullinum*

**– Eg var rættuliga óður,** tá eg fekk at vita at eg skuldi byrja á bonkinum. Tað sigur Ári Mohr Jónsson, tá hann greiðir frá steypafinaluni, sum HB vann í fjør.

Kviki vongbakkurin var ikki ímillum teir fyrstu ellivu í finaluni, men endaði kortini við at fáa ein avgerandi leiklut í steypasigrinum á grannunum.

– Tað var ein fantastisk kensla at vinna steypafinaluna – serliga móti grannunum úr B36. Ein minnisríkur dagur fyri meg, felagið og viðhaldsfólkini. Og at spæla ein so stóran leiklut í einum so avgerandi dysti, er nakað, ið eg fari at minnast aftur á við gleði.

Ári varð skiftur inn tá 64 minuttir vóru spældir, og 20 minuttir seinni javnaði hann til 2-2. Tá farið varð til brotssparkskappingina, var tað eisini Ári, sum skeyt avgerandi brotssparkið, ið tryggjaði HB Løgmanssteypið annað árið á rað.

**„Vit hava eitt sterkt venjaratoymið, og vit sóu í fjør hvussu nógv teir fáa burturúr spælarunum“**



## LYKLALEIKARAR ERU FARNIR

Stór útskifting hevur verið hjá teimum reyðsvørtu í vetur. Hanus Sørensen er farin til Slovenia at royna seg, Áki Samuelsen er seldur til Ranheim í Noregi, og Samuel Chukwudi er seldur til finskan fótbólt. Samstundis hevur liðformaðurin og málverjin, Teitur Matras Gestsson, valt at gevast við fótbólt á hægsta stigi.



*– Eg havi fult álit á, at bæði venjari og leiðsla hava tamarhald á, sigur Ári Mohr Jónsson*



*Fríða Magnusardóttir Jakobsen, HB*

Tí verður tað eitt HB lið við nógvum nýggjum spælarum, sum skal stríðast um FM í 2025. Men Ári Mohr Jónsson hevur tó stórt álit á bæði leiðslu og venjaratoymi.

– Tað er sjálvandi ófatiliga keðiligt at missa slíkar lyklaleikarar. Hetta eru nakrir stórir profilar á liðnum. Men vit hava eitt øgiliga sterkt venjaratoymið, og vit sóu í fjør hvussu nógv teir fáa burturúr spælarunum. Ejvind og Ási mentu seg nógv, og teir eru eitt ár eldri nú og aðrir ungir eru ávegis. Eg havi fult álit á, at bæði venjari og leiðsla hava tamarhald á hasum.

### FM ER MÁLIÐ

Seinast menninir í HB vunnu føroyameistaraheitið var í 2020, tá Jens Berthel Askou var venjari. Síðani tá hevur HB runnið aftaná KÍ og Víkingi, og hóast útskiftingin hevur verið stór í vetur, so er málið altíð tað sama í Havnar Bóltfelag.

– Í HB er tað altíð FM! Tað er altíð málsetningurin í felagnum, men nú fáa vit at síggja hvussu tað heila fer at spæla av, sigur Ári, sum samstundis vónar at hann í ár klárar at verða skaðafríur og spæla fleiri dystir í 2025.

### KVINNURNAR VILJA GERA TAÐ BETRI ENN Í FJØR

Í 2024 royndu kvinnurnar seg fyri fyrstu ferð við nýggja kappingarleistinum – við grundspæli og endaspæli. HB endaði í ovara endaspælinum saman við Víkingi, KÍ og NSÍ. Men úrtøkan var soltin – tær reyðsvørtu endaðu aftast við einum stigi.

**„Vit eru HB og HB fer altíð at vera eitt meistaralið, og tí skal tað gerast betri í ár“**

– Vit eru als ikki nøgdar við kappingarárið í fjør, sigur Fríða Magnusardóttir Jakobsen, sum við fleiri enn 70 dystum á fremsta liðnum hjá HB, telist millum royndu spælararnar, hóast hon bara er 18 ára gomul.

– Vit hava fleiri landsliðsleikarar og gott fólk, men allíkavæl skora vit bara fimm mál og fáa bara eitt stig í endaspælinum. Tað var ikki nóg gott.

Hópurin í ár er næstan tann sami. Største broytingin er, at Rebekka Benbakoura, sum spældi við HB eftir summarsteðgin, hevur skift til NSÍ.

Men Fríða og hinar í HB hava sett sær eitt greitt mál.

– Vit skulu fáa fleiri stig í ár. Vit eru HB og HB fer altíð at vera eitt meistaralið, og tí skal tað gerast betri í ár. Eg sigi ikki, at vit verða meistarar, men hetta er mentanin í HB. Vit eru ein ungur hópur og vit eru uppvaksnar í HB, og eru vanar við at taka ábyrgd, sigur Fríða Magnusardóttir Jakobsen, sum í ár væntandi skal umboða U19 landsliðið til EM-undankapping, ið samstundis verður hennara punktum á ungdómslandsliðunum.





UEFA
WOMEN'S
UNDER-17
CHAMPIONSHIP
FAROE ISLANDS 2025

# Størsta uppgávan nakrantíð

*Bæði ítróttarliga og praktiskt er talan um størstu avbjóðingina á føroyskari jørð, tá EM-endaspælið fyri U17 landslið við gentum verður í Føroyum í mai mánað. – Vónandi fáa okkarar spælarar eina góða uppliving og síggja hvussu langt tú kanst røkka, sigur Eyðvør Jakobsen, landsliðsvenjari*

**Tað hevur eftirhondini** merkt Fótbóltssamband Føroya í fleiri ár, at EM endaspælið fyri U17 landslið við gentum í ár skal verða í Føroyum.

Praktiskt er talan eisini um eina so stóra uppgávu, at næstan øll umsitingin í FSF meir ella minni verður í undantaksstøðu í døgunum 4. til 17. mai.

Tá koma sjey av teimum bestu londunum í Evropa til Føroya at dystast um EM-steypið. Eitt EM-endaspæl er ein umfatandi kapping og UEFA leggur nógva orku í, at øll viðurskifti eru upp á pláss.

Upprunaliga skuldi kappingin verða í 2021, men orsaka av koronafarsóttini bleiv endaspælið útsett. Tað er tí ein nýggjur árgangur av føroyskum U17-gentum, sum sleppa at royna seg móti heimselituni.

– Hetta eru spælarar, sum vit um stutta tíð koma at síggja í teimum stóru feløgunum í Evropa, sigur Eyðvør Jakobsen, sum hevur fingið til uppgávu at stjórna U17-landsliðnum.

**„Tað var ein møtumikil og hørð, men samstundis ein lærurík uppliving"**

Dystirnir verða spældir á Tórsvølli og á Djúpumýru í Klaksvík, og liðini koma at venja á fleiri vøllum kring landið. Umhvørvið kring dystirnar kemur at líkjast tí, sum vit kenna aftur frá vanligum A-landsdystum hjá monnum, og tað kemur at merkjast í fleiri av føroysku kappingunum, sum mugu leggjast rundanum EM-endaspælið

At talan er um eina stóra og umfatandi fótbóltskapping – ja, allarhelst tann størsta higartil – sæst aftur á øllum brøgdum.

Eitt nú verða venjingarnar hjá besta mansliðnum hjá KÍ ávirkaðar, allir dystirnir í endaspælinum verða sjónvarpsframleiddir við størari manning, og stór krøv vera sum heild sett til umstøðurnar.

Vætandi koma áleið 400 fólk, ið hava beinleiðis tilknýti til kappingini,


Spania vann U17 EM í 2024


Alba Cerrato bleiv kosin besti spælari í kappingini









*Eyðvør Jakobsen, U17-landsliðsvenjari*

til Føroya hesar dagarnar, og afturat teimum kann hugsast, at nakað av viðhaldsfólkum eisini leitar sær hendan vegin at hyggja eftir fótbólti.

Umframt Føroyar verða sjey lond við í kappingini. Hvørji hini sjey verða fæst at síggja, tá bólkarnir í undankappingunum, sum verða spældir í mars mánað, eru av.

## FORSMAKKUR OG FYRIREIKINGAR

Føroyska U17-landsliðið fekk í fjørheyst ein forsmakk upp á hvat tær kunnu vænta sær av mótstøðu í EM-endaspælinum. Tá luttóku tær í deild A í EM-undankappingini, og vóru í bólki saman við Onglandi, Hollandi og Kekkia, og ikki óvæntað endaði tað við greiðum tapum í øllum tromum dystunum.

– Tað var ein møtumikil og hørð, men samstundis ein lærurík uppliving. Vit spældu á St. Georges Park, har vit sóu venjingarmiðstøðina hjá Onglandi – sum var ein uppliving í sær sjálvum – men ítróttarliga var mótstøðan øgiliga sterk, fortelur Eyðvør Jakobsen, og leggur aftur at:

– Í deild A eru 28 tey bestu londini í Evropa. Nú møta vit vinnaranum av teimum 28 londunum. Hetta er toppurin av toppinum. Tað eru spælarar, sum væntandi um fá ár spæla í bestu deildunum í Evropa. Onkrar av teimum eru longu fulltíðar spælarar og venja við bestu liðunum.

**„Vit hava hildið gentunum til í vetur, har tær hava vant tvær ferðir um vikuna“**

Eyðvør Jakobsen droymir vónar, at føroyska liðið fær eina góða uppliving, og at ungu føroysku genturnar fáa nakrar góðar fyrimyndir at síggja á vøllinum.

– Eg sigi altíð áðrenn dyst, at hava vit gjørt alt tað vit eru mentar, so hava vit gjørt okkara. Vit kunnu ikki ráða yvir styrkini hjá mótstøðuliðnum, men vit skulu nokk vænta at bólturin verður nógv á okkara hálvu, sigur U17-landsliðsvenjarin.

Fyrr í ár var føroyska liðið í Íslandi og spældi tveir venjingardystir móti Breiðabliki, sum báðir endaðu við 2-1 sigri til Føroyar.

– Tað var ein góður túrur, har vit fingu royndt okkum móti eini javnt góðari mótstøðu. Tað ger at okkara máttu stríðast allar minuttirnar, sigur landsliðsvenjarin.

U17-landsliðið hevur vant í vetur, men hóast ein stór avbjóðing stendur fyri framman, hevur landsliðsvenjarin ikki sett sum krav, at spælararnir skulu leggja aðrar ítróttargreinar frá sær.















– Vit hava hildið gentunum til í vetur, har tær hava vant tvær ferðir um vikuna. Nakrar hava eisini verið virknar í øðrum ítróttargreinum, og tí hava vit loyvt, tí eg kenni á mær, at um vit spenna bogan ov høgt, so er vandi fyri frágongd. Eg vildi ynskt, at tað ikki var so, men soleiðis er veruleikin í Føroyum beint nú, sigur Eyðvør Jakobsen.

Føroyska liðið skal í mars mánað luttaka í EM-undankappingini í deild B. Her skulu Føroyar spæla móti Litava og Írlandi. Írsku genturnar fluttu saman við teimum føroysku niður úr deild A í fjørheyst.

– Tað er ein góð fyrireiking til EM-endaspælið. Vanliga hevði eg ikki ynskt Írland sum mótstøðu, tí tær eru so sterkar, men nú passar tað okkum væl.

Tær flestu á U17-landsliðnum spæla í løtuni við liðum í Betrideildini, og venja av tí sama rættuliga nógv.

## EINA FERÐ Í LÍVINUM

Niðurstøðan er, at ítróttarliga verður hetta væntandi ein harður umgangur, men eisini ein uppliving fyri lívið.

***„Spæla við feløgum, sum hava fulltíðar setup kring síni gentulið"***

– Tað eru fáir føroyskir spælarar, sum sleppa at royna seg í einum EM-endaspælið. Eg vóni, at hetta verður ein góð uppliving fyri okkara spælarar, og at tær síggja hvussu langt tær kunnu røkku við nógvari venjing og stórum dreymum, sigur Eyðvør.

Føroyar koma at møta liðum í heimselituni, har spælararnir eru væl trenaðir og væl skúlaðir. Í flestu førum er talan um spælarar, ið hava fótbóltin sum sína hægstu og kanska einastu raðfesting.

– Munurin er, at í Føroyum hava vit feløg, sum stríðast við at manna lið, meðan summar av hesum spæla við feløgum, sum hava fulltíðar setup kring síni gentulið. Tað sigur ikki alt, men tað fortelur eina søgu um hvat vit eru uppi í móti, sigur Eyðvør Jakobsen.

– Hetta er ein „once in a lifetime" møguleiki. Mín vón og mítt mál er, at vit gera alt tað vit kunnu og einki liggur eftir. Eg vóni eisini, at hetta kemur at vísa okkum, at vit kunnu seta krøv í gentufótbólti og at vit kunnu røkka longri, um vit leggja meira fyri í venjing, sigur hon at enda.

### Besti spælari í kappingini

| | | | |
|---|---|---|---|
| **2008** | Týskland | **Alexandra Popp** | Hevur verið liðskipari á týska A-landsliðnum og spælt við VfL Wolfsburg. Tvær ferðir hevur hon verið kosin ársins spælari í Týsklandi. |
| **2009** | Týskland | **Kyra Malinowski** | Venjari hjá besta kvinnuliðnum hjá VfL Bochum í Týsklandi. |
| **2010** | Spania | **Lola Gallardo** | Spælir við Atletico Madrid og hevur spælt 35 dystir við spanska A-landsliðnum. |
| **2011** | Spania | **Alba Pomares** | Spælir við Fundación Albacete. |
| **2012** | Frankaríki | **Sandie Toletti** | Spælir við Real Madrid og hevur spælt 63 dystir á franska A-landsliðnum. |
| **2013** | Pólland | **Ewa Pajor** | Liðskipari á póllendska A-landsliðnum og spælir við Barcelona. |
| **2014** | Spania | **Andrea Falcón** | Spælir við Benfica og á spanska A-andsliðnum. |
| **2015** | Týskland | **Stefanie Sanders** | Spælir við belgiska liðnum OH Leuven. |
| **2016** | Týskland | **Caroline Siems** | Spælir til dagligt við Werder Bremen. |
| **2017** | Týskland | **Lena Oberdorf** | Spælir við Bayern München og týska A-landsliðnum. |
| **2023** | Spania | **Vicky López** | Spælir við Barcelona og spanska A-landsliðnum. |
| **2024** | Spania | **Alba Cerrato** | Spælir við Sevilla FC Femenino og spanska U17-landsliðnum. |

# TEY DRÍVA Á VIÐ GÓÐUM TREYSTI

*Hóast stórt skuffilsi á Skála, tá besta mansliðið datt niður á niðurflytingarplássið eftir síðsta umfar í farna kappingarári, so bleiv farið í gongd við fyrireikingarnar til komandi kappingarár við stórum treysti*

**Hjá kvinnunum gekk** heldur betri. Skála vann minnu steypakappingina, samstundis sum nógvir ungir leikarar eru á veg upp á bestu liðini.

## MISTU Á STOKKINUM

Undan síðsta leikdegi í Betrideildini hjá monnum í fjør lógu skálamenn á áttanda plássi í deildini við 20 stigum, tvey stig fleiri enn B68, sum hevði 18 stig á níggjunda plássi. Skála skuldi leika í Havn móti B36, og B68 skuldi vitja hjá grannunum við Løkin.

Tey flestu mettu, at Skála fór at megna at halda seg uppi í bestu deildini, og at B68 fór niður í 1. deild saman við ÍF. Men heilt óvæntað vant B68 burturúr NSÍ, samstundis sum Skála tapti í Havn. Sostatt leyp B68 framum Skála í síðsta umfari, og teir á vestara armi á Skálafjørðinum máttu tískil tungu liðina niður í 1. deild.

## FORMAÐURIN ER BJARTSKYGDUR HÓAST ALT

– Vit fingu eina góða byrjan upp á kappingarárið, og lógu væl fyri til summarsteðgin. Tá valdu vit ikki at gera stórvegis broytingar, tí vit trúðu upp á okkara leikarahóp, sigur formaðurin í Skála Ítróttarfelag, Jóannes Arnsteinsson Prestá.

Formaðurin greiðir eisini frá, at leisturin, sum nevndin hevur sett sær fyri at virka eftir, er at røkka hægst møguligt, har bulurin á liðnum eru lokalir leikarar, og at tað verður arbeitt við fíggjarligum skynsemi, so at útreiðslurnar hjá besta liðnum ikki ganga út yvir annað virksemi hjá felagnum. Men formaðurin ásannar eisini, at tað var ein tung leið at flyta niður.

– Tað var tungt at síggja at liðið flutti niður, serliga tí tað longi sá út til at vit fóru at klára at halda okkum í deildini.



*Jóannes Arnsteinsson Prestá, Skála-formaður*




*Vinjard Johansen, Skála*

Men fyrireikingarnar eru í gongd aftur til komandi kappingarár, og vit dríva á við góðum treysti.

### VILJA UPP AFTUR SKJÓTAST GJØRLIGT

Kristian Martin Jakobsen er ein av spennandi verjuleikarunum hjá Skála, og hann viðgongur, at hann bleiv sera vónbrotin, tá tað varð greitt, at Skála flutti niður, men hann er tó vónríkur um komandi kappingarár.

– Vit fáa sett eitt spennandi og sterkt lið saman, og bulurin er lokalir leikarar, og vit hava eisini nakrar heilt spennandi ungar leikarar, sum møguliga fara at fáa størri leiklut í ár. Í 1. deild verður kanska størri møguleiki at sláa til, og framtíðin er spennandi, sigur sterki verjuleikarin.

### KVINNUVENJARARNIR LATA VÆL AT

Vinjard Johansen og Per Mikkelsen taka sær av besta kvinnuliðnum hjá Skála, og teir gleðast yvir gongdina í felagnum, serliga á kvinnusíðuni.

– Tað eru nógvar gentur sum spæla fótbólt á Skála, og eru vit nóg tolin, so eru góð sannlíkindi fyri, at Skála fer at gerast eitt oddalið um fá ár, sigur Vinjard Johansen, sum eisini var við til at byggja upp á kvinnusíðuni hjá NSÍ fyri nøkrum árum síðani.

**„Vit hava nakrar heilt spennandi ungar leikarar, sum møguliga fara at fáa størri leiklut í ár“**

Hann vísir eisini á, at tað bæði á kvinnu- og mannfólkasíðuni sæst, at ungdómsarbeiðið verður raðfest høgt. Tí leikarar sum hava sín uppruna í Skála Ítróttarfelag eru at síggja í fleiri feløgum kring landið.

Hetta er eisini í tráð við tað ætlan sum formaður felagsins tosar um, at ungdómsarbeiðið er eitt tað týdningarmesta hjá einum felagi at raðfesta. Kanska serliga hjá einum lítlum felagi sum Skála Ítróttarfelag.

### VIT ERU SERA STOLTIR AV OKKARA LEIKARUM

Vinjard Johansen, høvuðsvenjari sigur, at hann heldur at ungu leikararnir hava ment seg sera nógv bara hetta síðsta árið, og hann sær sera positivt upp á avbjóðingarnar, ið standa fyri framman.

– Vit hava nógvar ungar og evnaríkar leikarar á liðnum, og hesar hava ment seg rættiliga nógv í mun til síðsta ár, og vit eru sera stoltir av at hava hesar leikarar á okkara liði, sigur Vinjard.

Hann leggur afturat, at tað er trupult at seta sær ov høg mál, tá hópurin er so nýggjur, men at klára seg betur móti stóru liðunum er í øllum førum eitt mál, og so fær man at síggja, hvussu langt tað røkkur, tá grundspælið er liðugt.






# Runavíkar kommuna ynskir Skála ÍF bestu eydnu við kappingarárinum 2025

SKÁLA ÍTRÓTTARFELAG 1965

RUNAVÍKAR KOMMUNA

# BYGGJA FRÁ GRUNDINI Í FUGLAFIRÐI

*Mótsetningarnar eru stórir. Fyri tíggjum árum síðani satsaði ÍF – við Njal Reinert-Petersen sum formanni – upp á FM. Nú er hann aftur við róðrið, men boðskapurin er ein annar; „Vit eru klár til bestaliðsfótbólt aftur, tá stamman er okkara", sigur formaðurin*

Tað er ein gamal kenningur í ÍF, sum er valdur til nýggjan formann í felagnum. Njal Reinert-Petersen hevur tikið við eftir Georges Rouah, sum hevur sitið í sessinum síðani 2020. Njal-Reinert Petersen stóð eisini við róðrið á ársveitsluni í 2013.

Tá hevði ÍF tvær ferðir rokkið silvurheiðursmerkinum í landskappingini og nú var málið FM. Við nógvum pengum – ov nógvum – satsaði ÍF stórt, men líka síðani hevur gongdin verið í besta føri misjøvn, fyri ikki at siga vánalig.

Ítróttarliga hevur felagið ongantíð rokkið somu hæddum, men tað hava verið langtíðaræltlanir. Mest umstrídda avgerð, var at selja toppskjúttan Uros Stojanov á sumri í 2021. Tað úrslitaði í niðurflyting, men niðurstøðan frá táverandi formanninum var, at fíggjarstøðan hjá felagnum kom í fyrstu røð. Ein avgerð, sum núverandi formaðurin eisini tók undir við tá.

**„Vit noyðast at gera tingini á ein øðrvísi hátt. Rista posan av nýggjum og raðfesta øðrvísi"**

Felagið hevur framvegis havt trupult við finna stevið, og í fjør endaði besta mansliðið við at flyta niður. Hjá kvinnunum hevur leingi verið arbeitt við at skapa eitt grundarlag fyri einum liði í bestu deildini, og tað eru tekin um, at hetta er á veg. Liðið vann 1.deild og tapti bara eina ferð.

### RISTA POSAN

Nýggi formaðurin er ikki í iva um, at tað eru nýggjar tíðir í Fuglafirði. Tíðin, har tað blivu keypt heil lið, og har besta mansliðið fór við øllum, er farin.

– Vit noyðast at gera tingini á ein øðrvísi hátt. Rista posan av nýggjum og raðfesta øðrvísi, meðan vit øll, sum varða av felagnum, fara í eina djúpa sjálvransakan, sigur Njal Reinert-Petersen, ið lovar, at tað verður ikki nakað stórt innkeyp við honum á odda.



*– Keyp av meir ella minni einum heilum fótbóltsliði, kemur ikki fyri aftur, meðan eg standi við róðrið, sigur ÍF-formaðurin, Njal Reinert-Petersen*


Njal Reinert-Petersen,
ÍF-formaður

– Sjálvandi skulu vit í komandi tíðum hava eitt flaggskip. Sjálvandi skal flaggskipið hjá okkum hava bestu korini, ið vit kunna bjóða. Og sjálvandi spæla vit fyri úrslitinum, men beinleiðis keyp av meir ella minni einum heilum fótbóltsliði, kemur ikki fyri aftur, meðan eg standi við róðrið. Aldrin, sigur hann greiður á málinum.

Nýggja leiðin er at gera felagið langtíðarhaldbart, og tað verður gjørt við at seta sínar egnu spælarar við. Tíðin, tá ÍF hjúklaði um spælarar aðrastaðni frá, er farin, og málið verður ikki besta deildin aftur, fyrr enn stamman er lokal.

– Vit eru klár til bestaliðsfótbólt aftur, tá stamman er okkara, tá minst 8 av 11 eru okkara egnu. Tilfarið skal pussast av, snøggast og gerast klárt til fótbólt á hægsta stigi. Tað tekur tíð, men eg vil verða garantur fyri, at komandi árini satsa vit upp á okkara ungu. Eg tori at lova, at tað nú bert er upp til okkara ungu, um teir taka av og vísa vilja, tí kósin er sett hesum viðvíkjandi, sigur Njal Reinert-Petersen, sum tó hevur eina tillaging.

– Harvið ikki sagt, at vit ikki skulu kunna manna lið. Sjálvandi skulu vit hava ein hóp, sum telur tað, sum ein hópur skal telja, men tað kemur ikki at kosta pening, ið vit ikki eiga, sigur formaðurin og leggur staðiliga afturat:

– Vit skulu eiga pengar á bók og gevast at brúka pengar, sum vit ikki eiga. Tí uttan fíggjarligt skil og haldføri, so er ómøguligt at seta langtíðarmál og at droyma stórar dreymar.

**„Eg tori at lova, at tað nú bert er upp til okkara ungu, um teir taka av og vísa vilja, tí kósin er sett hesum viðvíkjandi“**

## LANGTÍÐARMÁL FYRI BESTU LIÐINI

ÍF hevur sett 34 ára gamla Kristoffer Kvistgaard sum høvuðsvenjara. Talan er um eitt fulltíðarstarv, og í fyrstu atløgu er sáttmálin galdandi næstu tvey árini. Afturat honum hevur felagið sett Sonna Djurhuus sum hjálparvenjara, Sjúrður Hovland Petersen sum málmansvenjara, og Gunnar Hjelm sum kropsligan venjara.

Hesir koma eisini at arbeiða við yngru spælarunum, og millum annað verður morgunvenjing ein partur av skránni.

Í ungdómsdeildini er ein avbjóðing, at felagið hevur bara fýra spælarar í U17, og tí er lagt saman við B68.

– Vit kunnu fegnast um, at teir fýra kunnu allir blíva til spælarar á besta liðnum, og at vit hava ein stóran og góðan U15 árgang, sigur formaðurin bjartskygdur, ið eisini fegnast um góðu gongdina hjá kvinnunum hjá ÍF, ið møguliga bara eru eitt ár frá at melda til í fremstu deildini.

– Vit umhugsaðu tað í ár, men vit valdu at bíða eitt ár. Vit hava ein stóran U16 hóp og tær hava best av at fáa eitt ár afturat, áðrenn vit skulu spæla í bestu deildini, sigur Njal Reinert-Petersen.

Boðskapurin úr Fuglafirði er, at hetta er ikki ein sprintur, men eitt maraton.

– Nógv av teimum málunum, sum vit hava sett okkum, koma at taka minst trý ár at røkka. Hetta er ikki ein hundrað metur sprintur, men eitt maraton, sigur Njal Reinert-Petersen at enda.

Til stuttleikа kann nevnast, at í Fuglafirði plaga tey at erpa sær av, at ÍF hevur hægsta limatal fyri hvønn íbúgva í heiminum. Tað er eisini ein lítil sigur.





Vit ynskja ÍF góða eydnu við kappingarárinum

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA



# Frankaríki er kryddið í áhugaverdari U21-undankapping

*Nýggja føroyska U21-ættarliðið skal royna seg ímóti fronsku stjørnunum, men bólkur C bjóðar eisini upp á spennandi dystir ímóti Estlandi, Luksemborg og Íslandi*

**Tá Frankaríki kom** úr bollanum saman við Føroyum til U21-lutakastið fyrst í februar, mundu fleiri minnast aftur á septemberdagin í 2021, tá føroyingar seinast royndu seg ímóti elstu unglingunum hjá stóru evropeisku fótbóltstjóðini.

Myndir av Steffani Løkin, sum fangaði eitt vánaligt útspæl frá franska málverjanum Illan Meslier, og sendi eftir jørð ímóti málinum úr 40 metrum, spæla framvegis á nethinnuni.

Ljóðið av algoysta frásøgumanninum, sum rópar, men kortini ikki fær orðið upp, dukar enn á trummhinnuni.

Tey fáu sekundini, bólturin ferðaðist ímóti mállinjuni við ráðaleysum verjuspælarum í hølunum, kendust sum ein ævi, men somikið størri var gleðin, tá hann endiliga náddi inn um mállinjuna og kíndi netmeskunum.




Tá Frankaríki vitjaði í Gundadali



U21 landsliðið

Tá hálvuráttandi minuttur var spældur í longdu leiktíðini, bríkslaði dómarin endiliga, og føroysku spælararnir kundu hálsfevnast í oysandi regninum, meðan fraklendingarnir nipnir máttu skunda sær í skiftingarrúmið.

## NÝGGJ ROYND Í SPENNANDI BÓLKI

Javnleikurin ímóti Frankaríki á Ovara vølli er kanska størsta úrslitið hjá U21-landsliðnum yvirhøvur, men langt frá hitt einasta góða úrslitið, sum elstu føroysku unglingarnir hava fingið.

So seint sum í seinastu undankappingini fingu Føroyar ikki minni enn 10 stig, og eftir lutakastið í februar, man málið vera at fáa nýggjar sigrar samstundis sum aðalmálið framvegis er at gera spælarar til reiðar til lopið upp á A-landsliðið.

Tí hóast tað altíð er spennandi og áhugavert at hitta komandi heimsstjørnurnar hjá eini tjóð sum Frankaríki, gav bólkurin hjá Føroyum avgjørt møguleika fyri fleiri øðrum áhugaverdum dystum í ár og næsta ár.

> **„Javnleikurin ímóti Frankaríki er kanska størsta úrslitið hjá U21-landsliðnum“**

Av tí at føroyingarnir vóru fluttir ein styrkisbólk upp, endaðu teir í bólki saman við Estlandi, Luksemborg, Íslandi, Sveis og áðurnevnda Fraklandi.

Av hesum hava okkara bert spælt ímóti Fraklandi fyrr, men uttan at siga ov nógv, tykjast møguleikarnir fyri góðum úrslitum lutfalsliga stórir, um nýggja U21 manningin megnar at liva upp til teir, sum hava mannað liðið seinastu árini.

## BYRJA Í ESTLANDI

Av teimum 10 dystunum í nýggju EM-undankappingini spæla Føroyar seks dystir í ár, og fýra í 2026. Lagt verður fyri á útivølli ímóti Estlandi leygardagin 7. juni, meðan fyrsti heimadysturin verður í Klaksvík fríggjadagin 10. oktobur, tá Frankaríki kemur á vitjan.

Sjálvt EM-endaspælið verður í Albania og Serbia í 2027.

# VILJA AFTUR Í BESTU DEILDINA

*Hóast teir í fjør droymdu um uppflyting til Betrideildina, so gjørdist veruleikin ein annar. 40 stig og eitt 6. pláss í 1. deild var úrtøkan hjá argjamonnum. Teir verða tí aftur at síggja í næstbestu deildini í 2025, men málið er framvegis tað sama*

**– Vit vilja vinna deildina.** Tað sigur 31 ára gamli Beinir Ellefsen, ið telist millum royndu leikararnar hjá AB. Hann leggur tó afturat, at kappingarárið eisini er góðkent um teir vinna sær uppflyting.

Tað var eitt vónbrot fyri argjamenn, at teir ikki megnaðu at flyta upp í fjør. Teir lógu leingi væl fyri í stríðnum um uppflyting, men seinastu seks dystirnar fingu teir bara seks stig, sum gjørdi at AB endaði á einum sætta plássi.

– Tað var øgiliga skuffandi, at vit ikki fluttu upp. Vit vóru hart raktir av skaðum í fjør, og samstundis var tað eitt ár, har nógvir av teimum ungu stóðu við nógvari ábyrgd. Vit høvdu eitt sera ungt lið við fáum royndum leikarum, sigur Beinir Ellefsen.

## ÚTISETIN VENDI HEIMAFTUR

Sjálvur var Beinir við í 23 av teimum 27 landskappingardystunum í fjør, og spældi samstundis sítt fyrsta heila kappingarár við AB síðani 2015. Eftir níggju ár í Danmark vendi Beinir heimaftur, og hann er fegin um at verða aftur Inni í Vika og á Argjum.

– Tað er gott at verða aftur. Og onkursvegna er tað eisini nattúrligt og heimligt at koma aftur til AB. Men eg skuldi hóast alt koma í ordiligan form aftur, og kroppurin skuldi venja seg við eina munandi hægri venjingarmongd, sigur Beinir, sum samstundis staðfesti at hansara leiklutur er broyttur síðani hann seinast hevði heimavøll Inni í Vika.




*Beinir Ellefsen, AB*




***Øssur Hansen, AB-venjari***

– Leikluturin hjá mær er nakað øðrvísi nú, í mun til tá eg fór. Tá eg fór úr AB var eg ein ungur, kvikur og orkuríkur bakkur, meðan eg í dag eri ein meir royndur leikari, sum hevur størri ábyrgd á og uttanfyri vøllin.

**BJARKI FER AT GERA MUN**

Ein spælari, ið hevur skrivað sáttmála við AB, er Bjarki Nielsen. Hann hevur seinastu árini spælt við teimum hvítu í Gundadali, men er í vetur farin út aftur á Argir.

Tað gevur eisini Beini og hinum á AB-liðnum góðar vónir til kappingarárið.

– Bjarki er komin heimaftur, og tað er ein góður spælari at fáa í hópin. Hann fer heilt víst at gera mun, tí við tí styrki, ið hann kemur við, kann hann avgera dystir. Samstundis sum vit hava fingið Bjarka aftur, so hava vit fleiri ungar spælara, ið allir eru blivnir eitt ár eldri og eitt ár royndari. Tí vænti eg, at vit fara at síggja eitt AB lið, sum er meir dominerandi í dystunum í ár, samanborið við í fjør.

***„AB er eitt felag, sum eigur at vera í bestu deildini. Vit skulu flyta okkum frá at vera eitt 'yoyo-lið' til eitt lið, sum altíð er at finna í fremstu deildini"***

**HØRÐ KAPPING UM UPPFLYTING**

Málið hjá argjamonnum er greitt – teir vilja aftur í bestu deildina, og Beinir Ellefsen hevur seinasta árið sæð framgongdina á Argjum, og heldur eisini, at AB hevur eina bjarta framtíð, har fleiri ungir spælarar eru ávegis.

– AB er eitt felag, sum eigur at vera í bestu deildini. Vit skulu flyta okkum frá at vera eitt 'yoyo-lið' til eitt lið, sum altíð er at finna í fremstu deildini, sigur Beinir, og leggur afturat, at tað aftur í ár verður hørð kapping um uppflyting.

– Vit vilja vinna deildina, men tað eru nøkur sterk lið, sum vit skulu kappast ímóti. Niðurflytarnir eru sterkir – samstundis sum B71 eisini vísti í fjør, at teir eisini skulu takast í álvara, sigur Beinir Ellefsen at enda.


Hilton Garden Inn™ Faroe Islands

Altjóða støði.
Serstakt útsýni.

Hilton Garden Inn Faroe Islands er samantvinningin av norðurlendskum marglæti og føroyskum hugna.

Gist hjá okkum og fá góðsku, tænastu og gestablídni á heimsstigi.

*Staravegur 13, Tórshavn* *www.hilton.fo*



HALLARTÚN

**BISTRO & BARR**
Í HILTON GARDEN INN

Við besta útsýni yvir grøna beltið í Hoydølum, liggur eitt upplivilsi vert at vitja.

Vit borðreiða til tey gomlu og tey ungu, til góman og til tungu, við allarbestu føroysku rávørunum.

Bílegg borð á www.hallartun.fo



# MIÐLARNIR TIPPA BETRIDEILDIN 2025

betri DEILDIN



## Jákup Ósá
*bolt.fo*

**Betrideildin MENN**
1. KÍ
2. VÍKINGUR
3. NSÍ
4. HB
5. B36
6. B68
7. EB/STREYMUR
8. 07 VESTUR
9. TB
10. FC SUÐUROY

**Betrideildin KVINNUR**
1. KÍ
2. NSÍ
3. VÍKINGUR
4. HB
5. B36
6. SKÁLA
7. FC HOYVÍK
8. 07 VESTUR



## Trygvi Absalonsen
*FM 1*

**Betrideildin MENN**
1. KÍ
2. VÍKINGUR
3. HB
4. NSÍ
5. B36
6. 07 VESTUR
7. EB/STREYMUR
8. B68
9. TB
10. FC SUÐUROY

**Betrideildin KVINNUR**
1. NSÍ
2. KÍ
3. VÍKINGUR
4. B36
5. HB
6. SKÁLA
7. 07 VESTUR
8. FC HOYVÍK



## Rúni á Reynatrøð
*FM 1*

**Betrideildin MENN**
1. KÍ
2. NSÍ
3. VÍKINGUR
4. HB
5. B36
6. 07 VESTUR
7. EB/STREYMUR
8. B68
9. TB
10. FC SUÐUROY

**Betrideildin KVINNUR**
1. NSÍ
2. KÍ
3. VÍKINGUR
4. HB
5. B36
6. SKÁLA
7. 07 VESTUR
8. FC HOYVÍK



## Heðin Arge
*Televarpið*

**Betrideildin MENN**
1. KÍ
2. VÍKINGUR
3. HB
4. NSÍ
5. B36
6. B68
7. EB/STREYMUR
8. 07 VESTUR
9. TB
10. FC SUÐUROY

**Betrideildin KVINNUR**
1. NSÍ
2. KÍ
3. VÍKINGUR
4. B36
5. HB
6. SKÁLA
7. 07 VESTUR
8. FC HOYVÍK



## John Andersen
*Televarpið*

**Betrideildin MENN**
1. NSÍ
2. KÍ
3. VÍKINGUR
4. HB
5. B36
6. 07 VESTUR
7. EB/STREYMUR
8. B68
9. TB
10. FC SUÐUROY

**Betrideildin KVINNUR**
1. NSÍ
2. KÍ
3. VÍKINGUR
4. HB
5. B36
6. 07 VESTUR
7. SKÁLA
8. FC HOYVÍK



## Sverri Egholm
*portal.fo*

**Betrideildin MENN**
1. KÍ
2. VÍKINGUR
3. NSÍ
4. HB
5. B36
6. EB/STREYMUR
7. 07 VESTUR
8. B68
9. TB
10. FC SUÐUROY

**Betrideildin KVINNUR**
1. KÍ
2. NSÍ
3. VÍKINGUR
4. HB
5. B36
6. SKÁLA
7. 07 VESTUR
8. FC HOYVÍK



## Jógvan Skeel Nolsøe
*Kringvarp Føroya*

**Betrideildin MENN**
1. KÍ
2. VÍKINGUR
3. NSÍ
4. HB
5. B36
6. 07 VESTUR
7. B68
8. EB/STREYMUR
9. FC SUÐUROY
10. TB

**Betrideildin KVINNUR**
1. KÍ
2. VÍKINGUR
3. NSÍ
4. HB
5. B36
6. SKÁLA
7. 07 VESTUR
8. FC HOYVÍK



## Símun Christian Olsen
*Kringvarp Føroya*

**Betrideildin MENN**
1. KÍ
2. VÍKINGUR
3. HB
4. NSÍ
5. B36
6. EB/STREYMUR
7. B68
8. 07 VESTUR
9. TB
10. FC SUÐUROY

**Betrideildin KVINNUR**
1. NSÍ
2. KÍ
3. VÍKINGUR
4. HB
5. B36
6. SKÁLA
7. FC HOYVÍK
8. 07 VESTUR



## Niels Petersen
*Televarpið*

**Betrideildin MENN**
1. KÍ
2. NSÍ
3. VÍKINGUR
4. B36
5. HB
6. 07 VESTUR
7. EB/STREYMUR
8. TB
9. B68
10. FC SUÐUROY

**Betrideildin KVINNUR**
1. NSÍ
2. KÍ
3. HB
4. VÍKINGUR
5. B36
6. SKÁLA
7. FC HOYVÍK
8. 07 VESTUR



## Tróndur Arge
*Ellivu*

**Betrideildin MENN**
1. KÍ
2. VÍKINGUR
3. HB
4. NSÍ
5. B36
6. 07 VESTUR
7. EB/STREYMUR
8. B68
9. TB
10. FC SUÐUROY

**Betrideildin KVINNUR**
1. NSÍ
2. KÍ
3. VÍKINGUR
4. HB
5. B36
6. SKÁLA
7. FC HOYVÍK
8. 07 VESTUR



# Landsliðini hjá FSF skrá 2025

| | | | |
|---|---|---|---|
| 31. januar | **U16 gentur** | Ísland – **FØROYAR** | ( Venjingardystur ) |
| 31. januar | **U17 gentur** | Breiðablik – **FØROYAR** | ( Venjingardystur ) |
| 2. februar | **U16 gentur** | Ísland – **FØROYAR** | ( Venjingardystur ) |
| 2. februar | **U17 gentur** | Breiðablik – **FØROYAR** | ( Venjingardystur ) |
| 21. februar | **A kvinnur** | Slovakia – **FØROYAR** | ( UNL ) |
| 22. februar - 2. mars | **U17 dreingir** | UEFA menningarkapping á Malta | |
| 25. februar | **A kvinnur** | Gibraltar – **FØROYAR** | ( UNL ) |
| 10. - 16. mars | **U17 gentur** | EM-undankapping í Litava | |
| 22. mars | **A menn** | Kekkia – **FØROYAR** | ( HM 2026 ) |
| 25. mars | **A menn** | Montenegro – **FØROYAR** | ( HM 2026 ) |
| 30. mars - 8. apríl | **U19 gentur** | EM-undankapping í Moldova | |
| 4. apríl | **A kvinnur** | **FØROYAR** – Moldova | ( UNL ) |
| 8. apríl | **A kvinnur** | **FØROYAR** – Gibraltar | ( UNL ) |
| 8. - 17. apríl | **U17 dreingir** | EM-undankapping á Malta | |
| 18. - 26. apríl | **U17 dreingir** | UEFA menningarkapping í Albania | |
| 4. - 17. mai | **U17 gentur** | EM-endaspæl í Føroyum | |
| 30. mai | **A kvinnur** | Moldova – **FØROYAR** | ( UNL ) |
| 3. juni | **A kvinnur** | **FØROYAR** – Slovakia | ( UNL ) |
| 7. juni | **U21** | Estland – **FØROYAR** | ( EM 2027 ) |
| 9. juni | **A menn** | **FØROYAR** – Gibraltar | ( HM 2026 ) |
| 4. septembur | **U21** | Ísland – **FØROYAR** | ( EM 2027 ) |
| 5. septembur | **A menn** | **FØROYAR** – Frankaríki/Kroatia | ( HM 2026 ) |
| 8. septembur | **A menn** | Gibraltar – **FØROYAR** | ( HM 2026 ) |
| 9. septembur | **U21** | Luksemborg – **FØROYAR** | ( EM 2027 ) |
| 6. - 15. oktobur | **U17 dreingir** | EM-undankapping í Kosovo | |
| 9. oktobur | **A menn** | **FØROYAR** – Montenegro | ( HM 2026 ) |
| 10. oktobur | **U21** | **FØROYAR** – Frankaríki | ( EM 2027 ) |
| 12. oktobur | **A menn** | **FØROYAR** – Kekkia | ( HM 2026 ) |
| 14. oktobur | **U21** | **FØROYAR** – Sveis | ( EM 2027 ) |
| 10. - 19. novembur | **U19 dreingir** | EM-undankapping í Ungarn | |
| 14. novembur | **A menn** | Frankaríki/Kroatia – **FØROYAR** | ( HM 2026 ) |
| 17. novembur | **U21** | Frankaríki – **FØROYAR** | ( EM 2027 ) |

*Sí eisini á **www.fsf.fo***



Eydna Skaale

# Felagsskapur og fríløtur við fótbólti

**Í Gundadali var dystur. Tað var eitt umfar í deildini hjá gentum 12-14. Ein ganska óbetýðiligur dystur sæð uttanífrá. Ein vanligur leygarmorgun í Havn við børnum tuskandi á ovara vølli.**

Men fyri genturnar inni á vøllinum snúði tað seg um lív ella deyð. Tað vóru vit, HB, móti fíggindanum, B36. Allar stríddust. Tað vóru fintur, flottar avleveringar og skot. Enntá onkur skallari.

Men har var ikki ein rond av fólki um vøllin við mammum og pápum og ommum og abbum og hepparum og fjepparum, sum í dag, tá ið børnini spæla dyst.

Ella … tað vil siga … Onkur var faktiskt og hugdi. Tí aftanfyri bygdaskýlið stóðu tvey fólk. Tey lúrdu undan vegginum og oman á vøllin – og tað er sannlíkt, at onkur hevur hildið tað síggja rímiliga mistonksamt út.

Tað vóru míni foreldur, sum høvdu fingið greið boskeð um at halda seg burtur. „Eg kann siga tykkum úrslitið, tá ið eg komi heim aftur", vóru boðini frá mær.

Tí tá vildu vit ikki hava foreldrini rennandi. Gundadalur var foreldrafrí sona, har venjarin hevði evsta orðið. Har vit lærdu at loysa egnar trupulleikar og har vit tóku okkum av hvørji aðrari og hjálptust at, um okkurt var.

Míni foreldur vildu hyggja. Men ikki síggjast. So tey lúrdu undan bygdaskýlinum. Og tað er eitt greitt tekin um dedikeraðan áhuga – næstan størri, enn tá ið eg sjálv havi staðið við síðulinjuna og heppað mínar døtur, tá tær hava spælt.

Og tað havi eg sjálvandi gjørt, tí nú eru tað ofta fleiri foreldur enn tað eru børn til kappingar. Eg tími tað ordiliga væl. Men eg havi eisini spurt meg sjálva, um børnini í grundini missa meira, enn tey fáa …

Vit geva teimum stuðul. Men tey missa møguleikan at mennast sjálvstøðugt, loysa trupulleikar sjálv – og at knýta sterk bond í felagsskapi.

Tí gleddist eg um, at feløg eru farin at siga: foreldur eru vælkomin at hyggja. Men børnini koyra saman og fylgjast, so tey kunnu skapa ein felagsskap.

Tí felagsskapurin í fótbólti røkkur so grúviliga langt forbí einstøku venjingarnar ella dystirnar.

Tað veit eg, tí… 30 ár eftir áðurnevnda dyst hjá gentum 12-14 ár, var aftur dystur í Gundadali. Eitt umfar í deildini hjá Old Girls. Ein ganska óbetýðiligur dystur sæð uttanífrá – ein vanligur leygardagur í Havn, men við hálvgomlum konum tuskandi á Niðara vølli.






SISU
Föroya Bjór